Sjúkrarøktaretiska
Ráðið



# ÁRSFRÁGREIÐING
# 2025

# INNIHALD


Ársins fyrsti fundur ... 3

Heimasíðan ... 5

Fráfaringarløtur ... 6

Valheilsanir ... 8

Talgild refleksjón ... 10

Innkomin mál ... 12

Dagføring av Sjúkrarøktaretisku leiðreglunum ... 14

Sjúkraøktarfrøðilig dygd undir trýsti? ... 16

Poddar ... 19

Vitlíki og etikkur innan heilsuverkið og almenna geiran ... 19

Bloggarí ... 20

Ert tú sjúkrarøktarfrøðingur ella sjúkrarøktarfrøðilesandi og hevur hug at blogga fyri Sjúkrarøktaretiska Ráðið? ... 22

Etikk-kveikjaranetið ... 23

Norðurlendskt samstarv ... 26

Felags framsøgn frá Norðurlendska Etikk-netinum hjá Sjúkrarøktarfrøðingum 2025 ... 30

Hvør hevur valdið yvir menningini av vitlíki innan umsorganarøkið? ... 30

Yvirlýsing frá Norðurlendsku Sjúkrarøktaretisku Ráðnum um harðskap móti heilsustarvsfólki og sjúklingum í Sudan ... 31

Føroyskt samstarv ... 32

Raðfestingar í almennum heilsutilboðum ... 32

Raðfestingar í heilsuverkinum ... 34

Rættvís raðfesting ... 37

Raðfestingarprosessin ... 41

Ein fyrilestur um dannilsi, etikk, sóma, sjálvsfatan – og kærleika ... 44

Bøkur og smárit ... 45

Forkvinnan takkar fyri seg ... 46

# ÁRSINS *fyrsti* FUNDUR

Ársins fyrsti fundur vardi ein heilan dag og var hildin í hugnaligum umhvørvi á Fiskatykkinum vesturi í Sandavági. Á skrá var samanumtøka av árinum, ið fór, og í felag at seta út í kortið fyri árið, ið júst var byrjað. Árið frammanundan var Ráðið rættiliga virkið, og yvirhøvur vóru ráðslimirnir væl nøgdir við avrikið. Glaðast vóru vit tó fyri Etikk-kveikjaranetið, sum tað eydnaðist at fáa í lag ikki so langt fyri árslok. Semja var um, at týdningarmesta arbeiði í Ráðnum er at tryggja etikk-kveikjaranetinum so góð kor, sum vit nú einaferð kunnu, og alt annað vit gera, hevur til endamáls at stuðla undir tað arbeiðið, so ella so. Ikki fyri etikk-kveikjararnar í sjálvum sær – tó at tað liggur okkum nær at hjarta, at tey hava tað gott – men tí at etikk-kveikjararnir eru ein miðil til málið um at skapa karmar fyri og tryggja skipaða refleksjón á øllum arbeiðsplássum, har sjúkrarøktarfrøðingar virka.

Refleksjónin er ein týðandi liður í at styrkja yrkisføri, fyribyrgja moralska strongd og mótvirka ráan. Hon gevur sjúkrarøktar-frøðingum møguleika at steðga á, umhugsa ella endurhugsa hugburð og gerðir, og soleiðis taka betur grundaðar avgerðir. Á tann hátt verða bæði røkt og arbeiðsumhvørvið betri, til gagns fyri tey, sum vit sjúkrarøktarfrøðingar eru sett til at vara av. Á hesum fundinum byrjaðu vit eisini so smátt at fyrireika okkum til aðalfundin hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar (FFS). Tað er nevniliga á hesum aðalfundi, at val til Sjúkrarøktaretiska Ráðið fer fram. Í Ráðnum vóru sjey limir, men tveir teirra, Birna Mohr Joensen og Marjun Thomsen, boðaðu báðar frá, at tær fóru at takka fyri seg aftaná drúgva tænastu. Hóast vit høvdu havt lýsing eftir nýggjum ráðslimum úti í nakrar mánaðir, var ongin, sum hevði vent sær til okkara enn. Vit byrjaðu tí so smátt at fyrireika okkum upp á, at vit framyvir fóru at vera fimm ráðslimir, og tað bar væl til. At vit yvirhøvur hækkaðu talið til sjey limir í 2023, hevði sín uppruna í, at virksemið í Ráðnum var økt munandi seinnu árini, og tí var játtanin alt ov tepur. Av tí sama brúktu ráðslimirnir drúgva tíð upp á at søkja pening ymsastaðni frá. Men av tí at játtanin hækkaði úr 30.000 kr. til 80.000 kr. at rokna frá aðalfundinum í 2024, krevst ikki longur líka stór arbeiðsmegi.

Hendan dagin á Fiskatykkinum fyrireikaðu vit eisini uppskotið til aðalfundin um at økja útgávutíðleikan av VØKU, sum til ber at lesa í á næstu síðu. Annars var árið lagt til rættis við uppskotum til tiltøk, verkstovur fyri etikk-kveikjaranetið, dagføring av yrkisetisku leiðreglunum og so framvegis. Tema fyri árið valdu vit skuldi verða REFLEKSJÓN. Nú árið er um at halla, kann eg staðfesta, at tað mesta, vit stungu út í kortið, er framt í verki.

# Uppskot til viðgerðar á aðalfundi í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hin 15. mars 2025 um øktan útgávutíttleika av VØKU

Nevndin í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum skjýtur upp at økja um útgávutíttleikan av VØKU til 4 – 6 ferðir árliga. Vit halda, at øktur útgávutíttleiki ikki bara fer at styrkja okkara felagskap og fakligu menningina, men eisini at skapa størri medvit um styrkir og avbjóðingar innan okkara fakøki.

Vøka er ein týðandi pallur til at savna okkum sum fakbólk, at deila vitan, sum hevur týdning fyri okkara fakligu praksis, og fyri at styrkja okkara felags fakliga samleika. Vit búgva og virka í einum smáoyggjasamfelagi við heilt serligum møguleikum og avbjóðingum og hava tí tørv á einum miðli, sum savnar føroyska sjúkrarøkt og gevur okkum møguleika at umrøða og lesa um føroysk viðurskifti.

Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar gera eitt megnar arbeiði hvønn einasta dag, og tað er av stórum týdningi, at hetta verður skjalfest í einum miðli, sum lýsir fakliga dygd, broytingar og nýskipanir í okkara yrki. Ein reglulig útgáva av Vøku gevur sjúkrarøktarfrøðingum høvi at greiða frá sínum arbeiði og fakligu menning. Hetta eggjar okkum sum fakbólk at halda vitan og førleikar við líka og gagnar bæði starvsfeløgum og teimum, sum hava gagn av okkara arbeið. Somuleiðis kann Vøka vera við til at varpa ljós á týdningarmikil evni sum røktarhættir, gransking, persónligar yrkissøgur og fakliga menning. Samstundis gevur hon rúm fyri at viðgera umstøðurnar hjá teimum, vit hava ábyrgd av, og varpa ljós á teirra tørv.

Okkara fakfelag umboðar stóran part av vælferðarøkinum, og tað hevur týdning, at vit hava ein miðil, sum tryggjar, at vitan um samfelagsligar avgerðir og fakligar broytingar røkkur limunum. Soleiðis kunnu sjúkrarøktarfrøðingar altíð vera dagførdir og fylgja við í menningini á økinum. Vøka kann verða við til at styrkja, ikki bara dialogin millum limirnar, men kann eisini virka sum eitt týdningarmikið amboð í almenna kjakinum. Við hesum fær sjúkrarøktin eina enn sterkari rødd, og fakligi týdningurin verður sjónligari.

Alt hetta er tó treytað av, at Vøka verður útgivin regluliga gjøgnum árið.

Vinaliga

Nevndin í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum:
*Lilian Dam, Birna Mohr Joensen,*
*Marjun Thomsen, Katrine Klein Arnbjerg,*
*Eva Mortensen Holm,*
*Ingun Gaardbo og Jana Mortensen.*

# HEIMASÍÐAN

Vit royna so frægt vit duga at leggja ymiskt út á heimasíðuna, sum er viðkomandi fyri sjúkrarøktarfrøðingar - samstundis sum vit vóna, at onnur vælferðarstarvsfólk eisini kunnu njóta gott av tilfarinum. Viðhvørt fáa vit hjálp frá kønum fólki til at tillaga tað, vit finna aðrastaðni, til føroysk viðurskifti. Tá vit so funnu “Stutt um etikk og viðkomandi lógir“ á eini norskari heimasíðu, fingu vit Eivy Christiansen, sum umframt at vera sjúkrarøktarfrøðingur, hevur eina master í lóg, til at finna fram til viðkomandi lógir í Føroyum. Heimasíðuna finnur her: https://sjukrarokt.fo/



# FRÁFARINGARLØTUR

Februarfundurin var hin seinasti hjá Marjun Thomsen, sum legði frá sær aftaná 15 ár í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum. Við sær á fundin hevði hon flottar køkur, umframt annað gott til góman og ein vakra, persónliga heilsu til hvønn einstakan av okkum, skrivað við hennara framúr vøkru hondskrift. Nøkur góð orð á vegnum fingu vit eisini í stuttari, ógvuliga viðkomandi røðu. Sjálvandi høvdu vit ein lítlan tanka til hennara eisini.

## Millum mangt annað gott, segði Marjun soleiðis:

*"Í tí skundmikla dagligdegnum, koma vit í støður, sum nema við okkara virðir. Um vit øll arbeiða etiskt, tørvar okkum so etiskar leiðreglur?*

*Vit eru øll bert menniskju. Men vit eiga at minnast til, at størsta møguleikan, at vísa hvussu etiskt væl reflekterað vit eru, fáa vit, júst í teirri løtuni, vit minst av øllum vænta tað!*

*Ein hermaður í gamla Grikkalandi, spurdi undrandi ein av sínum yvirmonnum:*

***"Um einki høpi er í einum ordra - er tað so skeivt ikki at akta ordran?"***

*Sum menniskju hava vit tann fría tankan, at undrast, hugsa og reflektera. Gævi tann fríi tankin má liva, og fáa loyvi at reflektera og filosofera upp ímóti m.a. Etiskum Leiðreglum, soleiðis at hetta endurspeglast og sæst aftur í okkara arbeiði!"*

Góða Marjun
Stóra takk fyri títt drúgva og trúgva íkast til sjúkrarøktaretikkina hesi mongu árini, og alt tað besta fram á leiðini í øllum lívsins viðurskiftum!

Tær kærastu heilsur frá okkum øllum í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum.

Á marsfundinum var tíðin komin at siga farvæl við Birnu Mohr Joensen, sum hevur tænt ráðnum væl hesi seinastu 13 árini.

Um tíðarskeiðið sigur Birna, at tað hevur verið sera lærurikt og gevandi at sitið í Ráðnum. Tó at arbeiðið hevur verið meira krevjandi hesi seinastu árini, eftir at SER skifti strategi til at verða meira proaktivt, hevur tað ikki verið minni hugaligt og spennandi at verið partur av. Í SER kunnu vit leggja afturat, at Birnusa partur hevur so ikki ligið eftir, til at fáa hetta ymiska av bakkastokki, sum SER tekst við.

Hóast ikki longur í sjálvum ráðnum, fer Birna í sínum dagliga yrki framvegis og áhaldandi at virka fyri, at refleksjónsrúmið í sjúkrarøktini fær góð kor. Refleksjónin er ein týðandi súla undir varðveitslu og menning av etiskum umhugsni og virki, og er ein táttur, sum Birna veruliga brennur fyri, skal verða ein náttúrligur partur av dagliga yrkinum hjá øllum sjúkrarøktarfrøðingum.

Til henda seinasta fundin, bjóðaði Birna leskiligar føstulávintsbollar og køku og sjálv fekk hon ein lítlan tanka frá okkum. Birna ynskir Ráðnum blíðan byr framyvir.

Góða Birna
Túsund takk fyri tíni nógvu ár í og mongu tøk fyri SER, sjúkrarøktini at frama. Saknur verður í tær! Alt tað allarbesta fram á leiðini ynskist tær og tínum.

Tær kærastu heilsur frá okkum øllum í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum.





# VALHEILSANIR

Í hesum meldrinum av sorgblíðum farvælheilsanum var hugaligt at frætta frá Evu og Lilian, sum báðar stóðu fyri vali og valdu at stilla upp aftur. Valheilsanirnar hjá teimum báðum kunnu lesast niðanfyri:

## Eva Mortensen Holm

Eg havi knapt 34 ára royndir sum sjúkrarøktafrøðingur. Síðan eg varð útbúgvin, havi eg arbeitt innan medisinska økið.

Gjøgnum árini havi eg tilognað mær fakliga og etiska vitan, serliga innan medisinska økið. Hesar royndir, saman við teimum trimum árunum eg longu havi tænt í ráðnum, hava ment mínar førleikar at skilja og miðla týdningin av etiskum virðum í sjúkrarøkt.

Um eg fái møguleika at halda áfram í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum, vil eg virka fyri at styrkja fakliga og etiska dialogin og arbeiða við at tryggja øllum sjúkrarøktafrøðingum møguleikar til at reflektera saman.

Sjúkrarøktaretiska Ráðið hevur nógv jørn í eldinum og eg vil fegin halda áfram at virka fyri, at vit hava eitt livandi ráð, sum stuðlar undir fakligari dygd allastaðni, har sjúkrarøktafrøðingar starvast.

## Lilian Dam

“Eitt menniskja hevur ongantíð við eitt annað menniskja at gera, uttan samstundis at halda nakað av lívi tess í hond síni” (Løgstrup). Hetta er ein sannroynd – og ein ábyrgd, sum sjúkrarøktarfrøðingar kenna í sínum dagliga virki.

Virðing fyri sjúklinginum, rættvísi, ábyrgd og rættastu avgerðirnar í einstøku støðunum, eru ein sjálvsagdur partur av sjúkrarøktini. Samstundis mugu sjúkrarøktarfrøðingar støðugt viga millum fakligu krøvini, etisku meginreglurnar, skiftandi samfelagsligu krøvini og tær avbjóðingar, ið stinga seg upp í praktiska arbeiðinum.

Etikkur hevur altíð haft mín áhugað, eisini í mínum arbeiði, og eg havi nú í 5 ár verið partur av SER. Tað hevur givið mær møguleikan at samstarva við øðrum, sum brenna fyri at tryggja, at sjúkrarøktin verður útint við denti á virðing, rættvísi og faklig etisk prinsippir.

Í SER viðgera og greina vit etisk mál, og viðmæla og geva leiðbeiningar um, hvussu etiskar avbjóðingar kunnu handfarast á sjúkrahúsum, røktarheimum og á heilsuøkinum annars. Viðmæli og leiðbeiningar verða grundaðar á gransking, etiskar leiðreglur og lógir, so at vit í felag tryggja bestu sjúkrarøktina fyri øll. SER arbeiðir eisini fyri, at sjúkrarøktarfrøðingar hava neyðugu amboðini til at taka rættastu avgerðirnar í arbeiðnum.

Eg stilli upp aftur til nevndararbeiði í SER, tí hetta arbeiði gevur góða meining, er áhugavert og neyðugt. Samfelagið broytist skjótt, og nýggjar fortreytir fyri sjúkrarøkt verða støðugt skaptar. Tí er tað av alstórum týdningi, at vit arbeiða fyri og halda fast í fakligu og etisku virðunum, sum skulu mynda sjúkrarøktina.

# TALGILD *refleksjón*

Longu í fjør byrjaðu vit í SER so smátt at arbeiða fyri at fáa talgilda refleksjón, og á Grækarismessu í ár var endiliga klárt. Tann dagin stóð at lesa á heimasíðu felagsins:

**Talgild refleksjón fyri sjúkrarøktarfrøðingar**

Seinastu árini hevur Sjúkrarøktaretiska Ráðið (SER) sett fokus á refleksjón sum eitt lykla-amboð til at økja um etiska tilvitið hjá sjúkra-røktarfrøðingum, sjúkrarøktarfrøðilesandi og leiðarum.

Umframt at styrkja førleikarnar at handfara etiskar avbjóðingar, kann refleksjón eisini vera ein háttur at forða fyri ella minka um moralska strongd, umsorganarmøði og ráan.

Seinasta átakið hjá SER er Talgilda Refleksjónin, sum er grundað á royndir úr Noregi.

**Endamálið er tvíbýtt:**

1. At gera refleksjónina lættari atkomuliga og stuðlandi fyri einstaka sjúkrarøktar-frøðingin og harvið styrkja tilvitið um og hegni til at reflektera.

2. At geva SER betri innlit í, hvørjar etiskar avbjóðingar sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum standa í, soleiðis at átøkini hjá Ráðnum kunnu málrættast enn betri.

Talgild refleksjón hevur fleiri fyrimunir, sum bæði kunnu gagna sjúkrarøktarfrøðingunum og arbeiðsumhvørvinum. Ein av týðandi fyrimununum er, at skipanin er lætt atkomulig – hon kann nýtast nær sum helst og á ymiskum tólum so sum fartelefon, teldu ella teldli. Hetta ger tað lættari hjá teimum at luttaka í etiskari refleksjón, hóast nógv er at gera.

**Anonymitetur og tryggleiki í refleksjónini**

Tað er týdningarmikið, at sjúkrarøktar-frøðingurin kann svara dulnevndur. Hetta gevur størri frælsi til at seta orð á etiskar av-bjóðingar, sum kunnu vera truplar at umrøða opið, eitt nú atburð hjá starvsfeløgum ella leiðslu, sum ikki er í samsvar við fakligu virðini. Tryggleikin í at kunna viðgera viðkvæm evni uttan ótta fyri avleiðingum ger tað møguligt at fáa eitt meira realistiskt innlit í tær veruligu etisku avbjóðingarnar á arbeiðsplássunum.

Tá nógv er at gera ella tá alt bara gongur eftir eini rutinu, er vandi fyri, at etiskar avbjóðingar ikki verða viðgjørdar ella yvirhøvur tiknar fram. Við at brúka talgilda refleksjón gerast hesar støður sjónligari og geva eina greiðari heildarmynd av etikki í verki.

**Dáta og málrættað etisk kjak**

Dáta, savnað gjøgnum talgilda refleksjón kann avdúka ymisk mynstur í avbjóðingum, sum ganga aftur. Sjúkrarøktaretiska Ráðið viðgerð

innkomnu refleksjónirnar og út frá mynstrum sum vísa seg, lýsir SER etisku tvístøðurnar úr ymiskum sjónarhornum við støði í etiskum ástøði og virðum.

Hesar lýsingar leggur SER út á almennu pallar okkara til gagns fyri allar sjúkrarøktarfrøðingar. Dáturnar kunnu eisini vísa á ymiskar samanhangir, t.d. nær, hvar og undir hvørjum umstøðum etiskar avbjóðingar koma oftast fyri. Harumframt kunnu tær staðfesta sambond millum ymiskar faktorar, so sum arbeiðstrýst og etiskt truplar støður.

Henda vitan ger tað møguligt hjá leiðsluni í sjúkraøktini at taka ítøkilig stig til at taka hond um hesar avbjóðingar og harvið stuðla bæði einum góðum arbeiðsumhvørvi og einari dygdargóðari sjúklingaumsorgan.

Økta vitanin kann eisini nýtast til at skipa málrættaðar verkstovur fyri etikk-kveikjarar og etiskar refleksjónsfundir á arbeiðsplássunum. Við støði í dátunum ber til at varpa ljós á tær etisku avbjóðingarnar, sum serliga gera seg galdandi á einstøku arbeiðsplássunum. Hetta kann menna etisku tilvitanina hjá starvsfólkunum og styrkja teirra førleikar at handfara etiskar trupulleikar í dagliga arbeiðinum

Vit vóna, at sjúkrarøktarfrøðingar og sjúkra-røktarfrøðilesandi í Føroyum taka væl ímóti tilboðnum um talgilda refleksjón.

Hesin tíðindastubbi vakti ans hjá Kring-varpinum og forkvinnan var í tíðindunum sama kvøldið og greiddi frá átakinum. Tann samrøðan kann hoyrast her

Men her raktu vit ikki rætt. Undirtøkan var ógvuliga løk, og hetta átakið verður tí niðurafturlagt, tá avtalan við veitaran gongur út í januar 2026. Tað eru uttan iva nógvar ymiskar orsøkir til, at átakið ikki eydnaðist, men tað fara vit ikki at kanna nærri sum er. Onkur av innkomnu støðunum er ring at anonymisera, so vit hava avgjørt at royna at koyra allar saman í eina støðu at viðgera til arbeiðsfundin í januar og síðan hana leggja á pallar okkara.

# INNKOMIN *mál*

Umframt talgildu refleksjónirnar, kom eitt mál inn til SER í ár. Ráðslimirnir vóru ikki samdir í, hvat er rættast at gera í slíkum føri, og valdu tí at lýsa fyrimunir og vansar.

## Innkomið mál um atkvøðuhátt á aðalfundinum hjá FFS

Sjúkrarøktaretiska Ráðið hevur fingið eitt mál til viðgerðar frá sjúkrarøktarfrøðingi, sum undrast á, um mátin at atkvøða um innkomin mál uppá, er etiskt forsvarligur.

Tað er soleiðis, at tey, sum koma á aðalfund fáa ein atkvøðuseðil. Tá atkvøðugreiðslan er, biður orðstýrarin tey lyfta atkvøðuseðilin upp, sum eru fyri uppskotinum. Tá atkvøðuteljararnir hava talt liðugt, verða tey, sum er ímóti uppskotinum, biðin um at gera tað sama.

Sjúkrarøktarfrøðingurin, sum hevur sent okkum málið til viðgerðar, heldur, at hesin mátin er ónøktandi, tí veljarin er ikki dulnevndur. Viðkomandi sigur m.a. “Eg hugsi, um tað eru fleiri, sum bara velja tað sama sum hini, tá tað verður gjørt uppá handan mátan. At man kanska ikki gevur sær so nógv far um, hvat man atkvøður ella at man ikki ynskir at fara ímóti tí, sum meirilutin atkvøður. Serliga tá man skal atkvøða um viðkvæm mál”

Ráðslimirnir eru ikki á einum máli um, hvat er rættast at gera og undir viðgerðini komu ymiskar grundgevingar fram, bæði fyri og ímóti.

## Grundgeving fyri opnari atkvøðugreiðslu

***Gjøgnumskygni og ábyrgd:***

Ein opin atkvøðugreiðsla tryggjar, at tilgongdin er gjøgnumskygd, og at limir standa til svars fyri síni atkvøðu. Hetta kann síggjast sum ein dygd, har ein alment stendur við sínar meiningar og tekur ábyrgd av felags avgerðum.

***Felagsskapskensla og demokrati:***

Tá atkvøðugreiðslan er sjónlig, kann tað styrkja um kensluna av felagsskapi og felags engagementi, tí limirnir ikki fjala sínar áskoðanir aftanfyri dulnevni. Hetta kann menna eitt meira virkið og erligt orðaskifti.

***Fyribyrging av óhepnari ávirkan:***

Um atkvøðurnar eru dulnevndar, kann tað møguliga lata upp fyri fjaldum dagskráum ella taktiskum atkvøðum, har limir atkvøða uttan at skula standa til svars fyri sítt val. Ein opin atkvøðugreiðsla minkar um vandan fyri fjaldari manipulatión og kann virka fyri, at allar avgerðir verða tiknar í einum opnum og ábyrgdarfullum umhvørvi.

## Grundgevingar ímóti opnari atkvøðugreiðslu

### *Vandi fyri bólkatrýsti og konformiteti*

Stúranin hjá sjúkrarøktarfrøðinginum snýr seg um, at opin atkvøðugreiðsla kann føra til bólkatrýst, har limir kenna seg noyddar at atkvøða við meirilutanum, heldur enn at fylgja síni egnu sannføring. Tað kann avmarka persónliga sjálvræðið og umhugsanina í atkvøðutilgongdini. Í støðum har avgerðir hava týðandi etiskar ella fakligar avleiðingar, er tað serliga umráðandi, at hvør einstakur limur kann taka eina væl umhugsaða avgerð uttan óneyðugt sosialt trýst.

### *Vantandi dulnevni kann forða fyri erligari atkvøðugreiðslu*

Í førum við viðkvæmum avgerðum kunnu summir limir lata vera við at atkvøða eftir síni veruligu sannføring av ótta fyri neiligum avleiðingum, so sum at verða sosialt útihýstur ella missa kollegiala virðing. Ein dulnevnd atkvøðugreiðsla kann tryggja, at allir limir atkvøða frítt uttan ótta, og soleiðis stuðla einari fakliga og etiskt haldgóðari avgerðarprosess.

### *Ójavnvág í valdi og ávirkan*

Um ávísir limir hava sterkari rødd ella hægri status í bólkinum, kann ein opin atkvøðugreiðsla geva teirra áskoðanum framíhjárætt, tí onnur kunnu kenna seg noydd at fylgja teimum. Ein dulnevnd atkvøðugreiðsla hevði kunnað mótvirkað hesi ójavnvág og tryggjað, at allar atkvøður veruliga telja líka nógv, uttan mun til fakliga ella sosiala støðu hjá limunum.

### *Lítla samfelagið*

Hóast bólkatrýst og ótti fyri sosialum avleiðingum kunnu gera seg galdandi í nógvum samanhangum, verður hetta ofta styrkt í smáum samfeløgum. Í Føroyum eru sjúkrarøktarfrøðingar ofta bæði í vinar- og/ella familjutilknýtið við hvønn annan, umframt at verða fak, -og starvsfelagar. Tá kann ein opin atkvøðugreiðsla gera tað enn torførari at vera óheftur í síni avgerð. Ótti fyri at skala samstarvið, skapa ósemjur ella órógva eitt lítið, samansjóðað umhvørvi kann føra til, at fólk atkvøða meira út frá sosialum bindingum enn eftir fakligari ella etiskari sannføring. Tað ger spurningin um dulnevni serliga viðkomandi í fakfelagsskapi, har viðkvæmar avgerðir skulu takast.

## Samanumtikið

Samanumtikið stendur valið millum gjøgnumskygni og ábyrgd øðrumegin, og persónligt sjálvræði og frælsi frá óneyðugari ávirkan hinumegin. Ein opin atkvøðugreiðsla kann stuðla transparentum og ábyrgdarfullum avgerðarprosessunum, men samstundis kann hon eisini føra til bólkatrýst og konformitet, sum ger tað torførari hjá einstøkum limum at taka eina veruliga sjálvstøðuga avgerð. Í fakligum og etiskum viðkvæmum málum kann tað tí vera ein fyrimunur, at tryggja dulnevnda atkvøðugreiðslu, soleiðis at hvør limur kann atkvøða frítt uttan ávirkan frá fakligum ella sosialum bindingum.

# DAGFØRING AV *Sjúkrarøktaretisku leiðreglunum*

Hin 14. apríl vóru vit aftur á einum heildagsfundi. Hesuferð vóru vit í fundarhølið hjá Kaffihúsinum og evnið var dagføring av yrkisetisku leiðreglunum. Við dagsenda, var hoyringsuppskotið lagt út á heimasíðuna og aðrar viðkomandi pallar til sjúkrarøktarfrøðingar at lesa og viðmerkja. Hoyringsfreistin var sett at verða hin 1 september og hóast onkrar áminningar vóru sendar út, var bert 1 hoyringsuppskot innkomið, tá freistin var farin. Hetta verður viðgjørt á dagsfundinum í januar. Leiðreglurnar verða síðan annaðhvørt góðkendar ella feldar á aðalfundinum hjá Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Í innleiðandi tekstinum til hoyringsuppskotið stendur millum annað:

### Innleiðandi viðmerkingar

Sjúkrarøktaretiska Ráðið endurskoðar yrkisetisku leiðreglurnar 5. hvørt ár fyri at meta um tørvin á møguligum dagføringum.

Í hesi dagføring eru evni sum vælferðartøkni, burðardygd, sosialir miðlar og etisk ábyrgd í einum lítlum samfelagi tikin við, fyri at lýsa tær avbjóðingar, sum sjúkrarøktarfrøðingar í vaksandi mun møta í einum fjøltáttaðum og broytiligum samfelagi, sum tí føroyska.

Yrkisetisku leiðreglurnar fyri sjúkrarøktarfrøðingar byggja á, nágreina og ítøkiliggera hvat verður hildið at vera etiskt ráðiligt, við støði í etisku leiðreglunum hjá ICN og grundleggjandi mannarættindunum, sum eru lýst í mannarættindasáttmálanum hjá ST.

### Serligar avbjóðingar í smáum samfeløgum

Sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum uppliva ofta serligar yrkisetiskar avbjóðingar, sum eru knýttar at smásamfelagnum. Í einum lítlum samfelagi, har fólk ofta kenna hvørt annað persónliga, kunnu mørkini millum yrkisleiklut og privatlív gerast ógreið. Tær tøttu sosialu bindingarnar elva ofta til etiskar tvístøður, sum kunnu gera tað trupult at taka óheftar avgerðir.

### Nýtsla av leiðreglunum

Fyri at leiðreglurnar skulu gerast eitt virki amboð, mugu tær gerast livandi við dagligari nýtslu. Leiðreglurnar skulu spegla samfelagsbroytingarnar og nýggju trupulleikastøðurnar, sum sjúkrarøktarfrøðingar møta.



Tú kanst viðvirka til at hækka støðið í yrkisetikkini hjá sjúkrarøktarfrøðingum og menna førleikan til etiska refleksjón við m.a. at nýta frymilin: “Etisk reflektión í sjúkrarøkt”. Etiskar reflektiónir eru umráðandi í einum samfelagi, sum støðugt verður meira fjøltáttað, og har etiskt umhugsni ofta verður raðfest ov lágt.

### Leiðreglurnar skulu virka fyri at

- fremja etiskt orðaskifti og umhugsni hjá sjúkrarøktarfrøðingum
- stuðla sjúkrarøktarfrøðingum í teimum støðum, tá ið etisk val vera tikin
- fremja góða skynið við tí í hyggju at menna fakliga kvalitetin í sjúkrarøktini
- seta fokus á etiskar tvístøður, so at etisk val verða sjónlig

Tíðindastubbi við viðkomandi leinkjum finna tit her:

Tíðindastubbi um dagføring av yrkisetisku leiðreglunum

# SJÚKRAØKTARFRØÐILIG DYGD *undir trýsti?*

Hin 24. apríl á ár, samtykti Løgtingið lógaruppskotið frá landsstýrismanninum Djóna Nolsøe Joensen, um løn undir útbúgving fyri tey, ið lesa á Heilsuskúla Føroya. Uppskotið heimilaði landsstýrismanninum í barna- og útbúgvingarmálum, at seta skipan í verk, har góðkendir arbeiðsgevarar kunnu søkja um lønarendurgjald frá landinum, um so er, at teir velja at seta í starv og gera útbúgvingarsáttmála við næmingar á Heilsuskúla Føroya og veita teimum útbúgvingarløn. Talan er um útbúgvingarnar til heilsushjálpara, heilsurøktara og námsfrøðiligan hjálpara

Í tí sambandi skrivaði forkvinnan soljóðandi lesarabræv:

## Sjúkrarøktarfrøðifaklig dygd undir trýsti?

Ein av mest umrøddu heilsupolitiska avbjóðingunum í nútíðar vesturlendskum samfeløgum er vantandi starvsfólk innan heilsu- og sjúkrarøkt. Hetta er eisini ein trupulleiki, sum vit merkja í her á landi, og sum framrokningar vísa, bara fer at vaksa seg størri komandi árini, verður onki munagott gjørt til at bøta um.

### Átøk fyri at bøta um starvsfólkatørvin

Í nógv ár hevur verið kjakast um, hvussu hesin haldføristrupulleikin kann loysast, og fleiri átøk hava verið sett í verk seinnu árini. Millum annað fekk Fróðskaparsetur Føroya fyri gott trimum árum síðan heimild at taka sjúkrarøktarfrøðislesandi upp tvær ferðir um árið. Samstundis fór sitandi samgonga til val við lyfti um at geva fakbólkunum innan umsorganarøkið eitt lønarlyft – fyri at gera tað meira atdráttarmikið at søkja starv á økinum og fyri at varðveita tey, sum longu arbeiða har. Innan sjúkrarøkt hava tey hildið hetta lyftið fyri ófaklærd starvsfólk, heilsuhjálparar og heilsurøktarar.

Eitt annað nógv umrøtt uppskot er at gera tað lættari at útbúgva seg til heilsuhjálpara og heilsurøktara. Millum annað er skotið upp at stovna fleiri Heilsuskúlar – ella at flyta verandi Heilsuskúlan til meginøkið – fyri at betra um atkomuna til hesar útbúgvingar. Enn eru tó ongar ítøkiligar ætlanir hesum viðvíkjandi.

Nógv ófaklærd starvsfólk arbeiða í dag innan eldraøkið. Fleiri teirra kundu hugsað sær at útbúgvi seg til økið, men tað er trupult at fáa fíggjarligu endarnar at røkka. Serliga hjá teimum, sum longu hava familju, húsalán og aðrar skyldur, er torført at liva av lestrarstudningi. Í eini roynd at loysa henda trupulleika hevur politiska skipanin nú samtykt

at veita løn undir útbúgving til heilsuhjálparar og heilsurøktarar, við tí vón, at tað fær fleiri at velja hesar útbúgvingar.

Tað skal vera okkara vón, at tiltakið eydnast væl og at fleiri fara at nema sær hesar útbúgvingar, sum eru ein týðandi súla undir vælferðarsamfelagnum.

### Týdningurin av at varðveita útbúgvingina til sjúkrarøktarfrøðing

Hóast vit fegnast um hesi tiltøk, eru vit eisini stúrin um, at verða sjúkrarøktarfrøðingarnir ikki raðfestir saman við øðrum fakbólkum, kann tað við tíðini elva til eina niðurlaging av sjúkrarøktarfrøði hópinum. Bæði løn og lestrarumstøður hava nakað at siga, tá fólk søkja sær útbúgving.

Tá løn verður veitt undir útbúgving til tær styttru røktarútbúgvingarnar, mugu vit sum samfelag spyrja, um tað kann elva til, at færri velja ta longru og fakliga meira krevjandi sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingina – sum ikki er lønargevandi undir lestrinum – og um hetta við tíðini kann minka um áhugan fyri útbúgvingini, hóast hon sum tann einasta gevur førleikar til at veita akutta og kompleksa sjúkrarøkt – sum allýst av Kirkevold (1).

Ein vandi við tí er, at fakliga samansetingin í røktini kann skeiklast – har talið av sjúkrarøktarfrøðingum minkar, meðan talið av røktarstarvsfólki við styttri útbúgving økist. Hetta kann fáa álvarsamar avleiðingar fyri dygdina í sjúkrarøktini.

### Tørvurin á fakliga høgum førleikum

Ofta verður tosað um “heitar hendur”, sum um tað er nóg mikið. Men, umframt teir persónligu eginleikarnar, krevur dygdargóð røkt bæði fakliga vitan, skil og hegni. Røkt snýr seg ikki bara um talið av starvsfólkum, men um fakliga førleikan hjá teimum, sum veita røktina í ymiskum høpi. Tí er neyðugt at hugsa um týdningin av øllum røktarútbúgvingunum, skal framtíðar haldføri tryggjast.

Vit merkja longu nú sviðan av, at tað ikki eru nóg nógvir sjúkrarøktarfrøðingar til at nøkta tørvin, bæði á sjúkrahúsunum og innan eldraøkið. Viðgerðirnar eru betur í dag enn fyrr, og tí liva fólk longri. Hóast nógv eldri fólk eru væl fyri, eru eisini alsamt fleiri, sum eru sjúk og hava fleiri sjúkur at dragast við í senn. Tað merkir, at røktin eisini krevur ein sjúkrarøktarfrøðing, sum megnar bæði akutta og kompleksa sjúkrarøkt – til dømis tá fólk eru illa sjúk, versna knappliga, ella hava fleiri sjúkur at dragast við í senn. Bæði akutta og kompleksa støðan krevja, at tað eru sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava ábyrgdina fyri røktini, tí hon krevur fakligar førleikar, sum fáast gjøgnum sjúkrarøktarfrøðisútbúgvingina.

Í heimshøpi er stórur mangul uppá sjúkrarøktarfrøðingar og m.a. í Danmark hevur hetta elvt til, at fleiri hundrað sjúkrahúspláss eru niðurløgd og at bíðilistarnir bara vaksa. Av hesum sama er dygdin í røktin eisini vorðin verri – bæði tí at sjúkrarøktarfrøðingar mangla og vegna ovurstóra trýstið, sum er á teimum, sum eftir eru (2) (3).

Altjóða gransking, grundað á sjúkrahúsøkið, vísir ein greiðan samanhang millum talið av sjúkrarøktarfrøðingum og avleiðingar fyri sjúklingar. Tá fleiri sjúkrarøktarfrøðingar eru á deildunum, eru deyðstíttleikin lægri, sjúklingatrygdin betri, nøgdsemi størri og røktargóðskan hægri.

Ein stór evropeisk kanning vísti til dømis, at tá talið av útbúnum sjúkrarøktarfrøðingum minkaði við 10 prosentstigum, øktist vandin fyri deyða eftir skurðviðgerð við 11 % (4). Aðrar granskingar vísa, at tá sjúkrarøktarfrøðingar veita røktina á eini sjúkrahúsdeild, kann vandin fyri deyða minka við meira enn 20 % (5).

Gransking úr Bretlandi og USA vísir eisini, at sjúkrahús, sum minka um talið av sjúkrarøktarfrøðingum og í staðin seta røktarstarvsfólk við styttri útbúgvingum, fáa verri úrslit: fleiri deyðstilburðir, longri innleggingartíð, minni nøgdsemi og størri hall í rakstri (6) (7). Har fleiri sjúkrarøktarfrøðingar eru, eru úrslitini hinvegin betri á fleiri økjum (6).

### Ein áheitan um orðaskifti

Vit fegnast um, at tær styttru røktarútbúgvingarnar hava fingið betri sømdir – tað er ein neyðug og vælkomin raðfesting av týdningarmiklum fakbólkum. Men um sjúkrarøktarfrøðingarnir samstundis verða gloymdir, kann tað fáa álvarsamar avleiðingar.

Tí mugu vit sum samfelag finna eina haldføra loysn, sum eisini tryggjar góðar lestrar- og arbeiðsumstøður fyri sjúkrarøktarfrøðingar. Vit hava brúk fyri einum breiðum og opnum orðaskifti um, hvussu vit tryggja røktina frameftir – eisini fyri tey, sum hava tørv á kompleksari sjúkrarøkt.

Tað er týdningarmikið at leggja dent á, at hetta snýr seg ikki um tørvin hjá sjúkrarøktarfrøðingum, men um tørvin á sjúkrarøktarfrøðingum. Tað er fyrst og fremst ein spurningur um trygd, dygd og lívsgóðsku hjá teimum, sum sjúkrarøktarfrøðingar í sínum starvi vara av – í góðum samstarvi við aðrar yrkisbólkar.

Vegna Sjúkrarøktaretiska Ráðið
*Jana Mortensen, forkvinna* [1]

Hóast lógaruppskotið var samtykt í apríl, gekk tó fitt av tíð at fáa ymiskar snøklar upp á pláss. Men í oktober eydnaðist at fáa semju í lag millum partarnar og avtalan um løn undir útbúgving fyri heilsuhjálparar, heilsurøktarar og námsfrøðiligar hjálparar var sett í gildi hin 1. november í ár.

Avtalan kann lesast her:
Serstøk avtala um løn undir útbúgving

[1] Keldulisti er í tíðindastubbanum á heimasíðuni

# PODDAR

## í samstarvi við KVF framleiðir SER poddar, sum so ella so snúgva seg um sjúkrarøktaretikk.

Í ár bleiv tað til ein podd, har Armgarð Arge tosaði við Elisabeth Hall, professara, sum í nógv ár hevur granskað í og skrivað um ymisk aspektir av sjúkrarøkt – eisini av etikki í samband við sjúkrarøkt. Hesin poddur kom seg av tí, at á altjóða sjúkrarøktarfrøðidegnum, 12. mai, heiðraðu Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Deildin fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi á Fróðskaparsetur Føroya Elisabeth, fyri hennara íkast til gransking og menning av sjúkrarøkt í Føroyum.

Elisabeth hevur verið knýtt at DHS og hevur vegleitt phd-lesandi og eggjað og stimbrað til gransking og menning á deildini.Umframt tað hevur hon granskað í viðurskiftum knýtt at sjúkrarøkt í Føroyum og føroyskari skúkrarøktarsøgu.

Elisabeth Hall sigur tað er um at gera hjá einum landi at granska í teirra sjúkrarøktarsøgu. Soleiðis kann mann virðismeta, hvussu var hetta tíðarskeiðið, hvat var gott og hvat var minni gott. Hví var tað so og hvat bera vit við okkum í ókomnum døgum.

Hesin poddurin og aðrir við eru at finna her

# VITLÍKI *og etikkur innan heilsuverkið og almenna geiran*

Hin 28. mai skipaðu Etiska Ráðið og Fróðskaparsetur Føroya fyri ráðstevnu. Sjúkrarøktaertiska Ráðið var umboðað á tann hátt, at forkvinnan var boðin við í pallborðið, sum til ber at síggja á leinkjuni: Pallborðsfundur við Martini Zachariasen, Regini Berg, Janu Mortensen, og Noomi Gregersen.

Millum framløguhaldararnar vóru tveir sjúkraøktarfrøðingar. Hin fyrra var Jóngerð Guttesen, leiðari í Roðanum og limur í Etiska Ráðnum, sum tosaði um Vitlíki og eldraøkið. Hugaligt er at gera eitt síðuspring og nevna, at Jóngerð var kosin Ársins Almenni Leiðari í ár. *Enn einaferð hjartaliga tillukku við tí.*

Hin sjúkraøktarfrøðingurin sum hevði eina framløgu var Maria Hammer Olsen, kliniskur útbúgvingarleiðari á Deildini fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi á Fróðskaparsetri Føroya, sum tosaði um Vitlíki í føroysku heilsutænastuni.

# BLOGGARÍ

Við støði í framløguni frá ráðstevnuni um vitlíki og etikk innan heilsuverkið og almenna geiran, skrivaði Maria Hammer Olsen ein blogg.

**Heilsutøkni og etikkur í sjúkrarøkt**

Heilsutøkni sum t.d. vitlíki ger seg meira og meira galdandi í heilsuverkinum. Talan er um tøkni, sum kann greina skanningar, blóðroyndir og journaldata, hjálpa okkum at skriva og geva okkum uppskot og vegleiðingar. Men hóast alt hetta, er vitlíki bara eitt amboð. Tøkni hevur hvørki kropp, kenslur ella samvitsku. Hon veit ikki, hvat orð merkja í eini menniskjaligari fatan, men roknar seg fram til sannlíkar niðurstøður út frá stórum dátamongdum. Tí má vitlíki ongantíð standa einsamalt, men altíð verða brúkt saman við fakligum og menniskjaligum skyni, etiskari ábyrgd og umsorgan.

Tøkni verður javnan grundgivin við effektivisering og sparingum. Hvussu kunnu vit gera meira, skjótari og bíligari? Tað eru spurningar, sum verða settir, tá nýggjar skipanir verða tiknar í nýtslu. Men etikkurin spyr heldur: Hvussu væl verður røktin framd? Er sjúklingurin eitt menniskja ella bara ein uppgáva, sum skal loysast? Hvør fær veruliga ágóðan? Og hvat missa vit av virðum, um vit bara hugsa í minuttum og krónum?

Ein vandi við heilsutøkni er, at vitlíki og onnur tøkni kunnu flyta uppmerksemi hjá heilsustarvsfólkum frá sjálvum sjúklinginum og yvir á skermin. Um vit líta ov nógv á algoritmur, kann týdningurin av anamnesu, kliniskum eyga og samrøðu vikna. Vitlíki verður longu í dag brúkt til at greina myndir og dátu við støði í skanningum, røntgenmyndum og blóðroyndum. Hetta kann bøta um bæði útgreining og viðgerð, men samstundis er etiski trupulleikin greiður: Uppmerksemið kann flyta seg burtur frá søguni hjá sjúklinginum og yvir til tøkni. Tí kann sjúklingurin kenna seg ósjónligan og týdningarleysan – og hansara ella hennara subjektiva uppliving av støðuni verður sett í aðru røð saman við fakliga skyninum.

Eitt lítið dømi: Í undirvísing í hjartamassasju brúka lesandi dukkur saman við appum, ið geva vegleiðing um t.d. frekvens og dýpd. Tá øll eygu eru heft at telefonini, kann tann "sjúklingurin" sum verður arbeitt við, næstan hvørva úr sjónarringinum. Men tað er júst hetta menniskja, sum er kjarnin í røktini – og tað má ikki hvørva, hvørki í verki ella í huganum.

> **!** Tá øll eygu eru heft at telefonini, kann tann "sjúklingurin" sum verður arbeitt við, næstan hvørva úr sjónarringinum.

Gransking vísir, at sjúkrarøktarfrøðingar ofta hava eina reaktiva tilgongd til nýggja tøkni. Vit taka ímóti, tá hon longu er sett í verk, men vit eiga í størri mun at bjóða okkum fram,

áðrenn avgerðir verða tiknar. Vit mugu ímynda okkum, hvussu tøkni ávirkar umsorganina, hvat hon kann hjálpa við og hvørji virði eru í spæl. Sjúkrarøktarfrøðingar hava neyðuga innlitið til at meta um, hvat tøkni kann brúkast til, hvussu hon kann styrkja røktina – og hvar markið gongur. Tað hava vit bæði fakliga og etiska skyldu til.

Ofta verður tøkni lýst sum køld ella umboð fyri ein mótsetning til tað menniskjaliga. Hetta ger seg eisini galdandi, tá vit tosa um robottar, talgildar skipanir og vitlíki. Tað verður hildið, at tøkni ger menniskju til objektir, og at tað týdningarmiklasta – relatiónin og umsorganin – fer fyri skeyti. Men tað eigur ikki at vera ein spurningur um "tøkni ella menniskja". Heldur eigur spurningurin at vera, um tøkni tænir røktini – og hvussu. Tøkni má nýtast til at stuðla undir okkara arbeiði, men ikki at seta hana í staðin fyri tað menniskjaliga. Hetta setur krøv til okkara førleikar, fakligu sjálvsfatan og refleksjón.

**! tað eigur ikki at vera ein spurningur um "tøkni ella menniskja"**

Hetta er eisini ein týðandi partur av hoyringsuppskotinum til nýggjar yrkisetiskar leiðreglur fyri sjúkrarøktarfrøðingar, skrivað við íblástri frá altjóða etisku leiðreglunum hjá ICN frá 2021. Í handritinum hjá ICN verður staðfest, at sjúkrarøktarfrøðingurin tryggjar, at nýtslan av tøkni og vísindaligum frambrotum er í samsvari við trygd, virðing og rættindi hjá menniskjum. Tað verður eisini undirstrikað, at sjálvt um vitlíki og robottar verða partur av røktini, má umsorganin framvegis vera persónsmiðjað, og sambondini millum menniskju mugu varðveitast.

Í dag síggja vit ymiska tøkni, sum eggjar til rørslu, gevur ávaringar, minnir á medisin og hjálpir við máltíðum. Hetta kann økja bæði trygd og lívsdygd – men vit mugu minnast, at vitlíki ikki veit av, um ein persónur er einsamallur, keddur ella óttafullur. Tøkni hevur onga empati, onga innliving, og er ikki tilvitað um huglag ella ósøgd orð. Hon troystar ikki – og kann tí ikki avloysa tað menniskjaliga.

Tí arbeiða vit í sjúkrarøktarfrøðini við hugtakinum tøknifatan – sum merkir evnið at skilja, greina og viðgera tøkni fakliga og kritiskt. Hetta umfatar bæði eina instrumentella fatan – hvussu tøkni virkar og verður nýtt – og eina relationella fatan – hvussu tøkni ávirkar samband, leiklutir og virðir. Hesin dansurin millum millum menniskja og tøkni, er ótrúliga týdningarmikil og krevur, at vit hava stev. Og tað eigur altíð at vera menniskjað, sum skipar dansin.

Men hvat hendir, tá tøkni ger feilir? Hvør hevur tá ábyrgdina? Er tað tann, sum hevur innstillað hana? Framleiðarin? Ella sjúkrarøktarfrøðingurin, sum fylgdi vegleiðingunum? Og hvat gera vit, tá sjúklingurin ikki vil brúka talgildar skipanir ella hevur trupulleikar at skilja tær? Skapa vit ójavna, um vit vænta, at allir borgarar hava útbúgving og orku til at halda seg dagførdan við eHeilsu? Útgangsstøðið hjá okkum er altíð sjúklingurin, men tá sambandið verður talgilt, broytist kontaktformurin. Og tað er ein etisk avbjóðing, sum vit mugu taka í álvara.

**! Patienten er ikke længere en man kigger på, men en man klikker på.**

Longu í 2011 vístu Birkler og Dahl á, at talgild data spakuliga verða tikin fram um fysiska og sansandi observatión. Birkler orðaðu tað

soleiðis: “Patienten er ikke længere en man kigger på, men en man klikker på.” Hetta er ein setningur, ið setur spurnatekin við, hvørjar avleiðingar tøknimenningin kann hava fyri arbeiðið sum sjúkrarøktarfrøðingur.

Í útbúgvingini til sjúkrarøktarfrøðing verður nú størri dentur lagdur á júst hetta samspælið millum menniskju og tøkni. Vónin er, at komandi ættarlið av sjúkrarøktarfrøðingum verða tilvitað um ábyrgdina og fatanina av hesum dansi – og við hesum í førninginum bjóða seg fram til at standa í fremstu røð og skilgreina, hvørjar sjúkrarøktaruppgávur tøkni kann stuðla undir, og hvørjar hon ikki kann avloysa. Tað hava vit longu nú eina professionella og etiska ábyrgd av at tryggja.

Óansæð hvat, má menniskja ongantíð skrivast út úr líkningini.

### Ert tú sjúkrarøktarfrøðingur ella sjúkrarøktarfrøðilesandi og hevur hug at blogga fyri Sjúkrarøktaretiska Ráðið?

Bloggurin skal snúgva seg um sjúkrarøktaryrki ella tað at verða sjúkrarøktarfrøðingur í breiðum týdningi. Hann hevur ikki fyri neyðini at snúgva seg um etikk og kann bæði verða álvarsamur, stuttligur, spískur, speiskur ella júst soleiðis, sum tú heldur hann skal vera. Hann skal tó í øllum førum vera siðiligur og í ongum føri ófantaligur, speirekandi ella særandi.

Tú bindur teg ikki til at skriva meira enn tann eina bloggin, men er vælkomin at skriva fleiri. Bloggurin verður útgivin á heimasíðuni hjá FFS og annars á talgildu pallum okkara. Um vit halda, at onkur bloggur eigur at røkka longri, verður tað gjørt í samráð við rithøvundan, uttan so at hesin er dulnevndur.

Tað ber nemliga til at verða dulnevndur, tó ikki fyri Sjúkrarøktaretiska Ráðnum. Vit skulu altíð vita, hvør tað er sum skrivar. Ráðið virkar sum ritstjórn, soleiðis at skilja, at vit tilskila okkum rætt til at lata verða við at geva ein blogg út, um hesin ikki lýkur krøvini fyri siðiligheit. Vit loyva tó øllum sjónarmiðum framat, so ein bloggur umboðar ikki neyðturviliga sjónarmiðini hjá Sjúkrarøktaretiska Ráðnum. Bloggurin skal verða millum 450 og 900 orð til longdar 500,- kr. verða latnar fyri hvønn útgivna blogg. Í mesta lagi ein bloggur verður givin út um mánaðin.

Hevur tú okkurt upp á hjartað, skriva so til okkara á etikkur@sjukrarokt.fo

Bloggarnir hjá Sjúkrarøktaretiska Ráðnum finnur tú her

# ETIKK-*kveikjaranetið*

## Við íblástri frá skipanini við álitisumboðum, setti SER sær í fjør fyri, at royna at menna eitt netverk av etikk-kveikjarum við tí endamáli, at skapa karmar fyri at tryggja skipaða refleksjón á øllum arbeiðsplássum, har sjúkrarøktarfrøðingar starvast.

Sum er, eru gott 100 fólk í etikkveikjaranetinum, harav gott og væl helvtin eru etikk-kveikjarar og nakað undir helvtin eru leiðarar hjá etikk-kveikjarum.

Uppgávan hjá etikk-kveikjarunum er í høvuðsheitum at leiða skipaðar refleksjónir. Tað er ikki eitt krav, at skipaða refleksjónin skal snúgva seg um etikk. Heldur skal refleksjónin kunnu rúma tí, sum nú fyllir hjá einstaka starvsfólkinum ella í starvsfólkahópinum, og tann vegin koma etiskt truplar støður automatiskt upp. Tá er tað, at etikk-kveikjararnir skulu kunna lofta hesum vandamálum og duga at fasilitera eina etiska greining av støðuni. Tað er í hesum sambandi týdningarmikið at nevna, at allir limir framvegis kunnu skriva til Sjúkrarøktaretiska Ráðið á etikkur@sjukrarokt.fo.

Uppgávan hjá leiðarum er at tryggja karmarnar fyri, at tað ber til at hava skipaðar refleksjónir við jøvnum millumbili og at tryggja sær, at etikk-kveikjarin fær neyðugu heimildirnar, til at lyfta sína uppgávu.

Uppgávan hjá SER er at verða til taks hjá Etikk-kveikjarunum og til at skipa fyri verkstovunum, soleiðis at øll í etikk-kveikjaranetinum eru ílatin til uppgávuna. Tríggjar heildags verkstovur verða fyriskipaðar árliga fyri leiðarar og etikk-kveikjarar saman og ein hálvdags verkstova fyri bólkarnar hvør sær. Endamálið við verkstovunum er partvíst at tryggja vitanardeiling, og partvíst at dugna partarnar, millum annað við at bjóða serfrøðingunum inn at halda upplegg ella fyrilestrar, sum vit kunnu arbeiða víðari við.

Nærri frágreiðing er at finna her og í faldaranum Etikk-kveikjaranet. Enn er rúm fyri nógvum afturat. Skriva til etikkur@sjukrarokt.fo fyri nærri kunning um tilmelding.

### 1. verkstovan

Hin fyrsta verkstovan í ár var hildin hin 24. februar í hølunum hjá Bátafelagnum á Bakka á Glyvrum.

Verkstovuleiðari var fyrrverandi forkvinna í danska SER Anne Bendix Andersen. Hon er lektari á sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingini á VIA University, Campus Viborg, og greiddi millum annað frá, hvussu etisku førleikarnir hjá sjúkrarøktarfrøðingum kunnu mennast við refleksjón og refleksiviteti. Dagurin var skipaður við framløgum um etikk, dialogi um evnið og venjingum av metoduni “Skipað etisk refleksjón”. Luttakararnir vóru bidnir um at

greiða frá ymiskum etiskt trupulum støðum, sum tey standa í javnan, og úr rúgvuni kann nevnast

- Mismunur verður gjørdur á fólki grundað á aldur.
- Sambært yrkisetisku leiðreglunum, skulu vit verja lív, til tað frá náttúrunnar síðu má haldast at vera endað. Men viðgerðarmøguleikarnir eru nógvir, og ofta kann tað tykjast vera etiskt óforsvarligt, at halda á við at leingja lívið hjá ógvuliga gomlum og sjúkum fólki.
- Spennið millum autonomi og paternalismu. Nær er paternalisma veik?
- Ósamsvar millum ynski hjá avvarðandi og fakligu metingina hjá sjúkrarøktarfrøðingunum.

Dagurin var spennandi og fólk vóru ógvuliga eldhugað og engagerað – nakað, sum Anne var ógvuliga imponerað av.

## 2. verkstovan

Mánadagin hin 26. mai, var triðja verkstovan við etikk-kveikjaranetinum hildin - hesuferð á heiminum við Vágna í Klaksvík. Knapt 50 luttakarar vóru við, sum er eitt vet færri, enn tað hevur verið til undanfarnu verkstovurnar. Tað hendir ofta nógv í mai, og nógvir etikk-kveikjarar og leiðarar vóru upptiknir aðrastaðni. Tað merktist tó ikki, tí rúmið osaði av eldhugi, vælvild og góðum hugskotum til loysn av ymiskum – serliga skipanarligum - avbjóðingum.

Eftir ætlan skuldi Svanna Jákupsdóttir hava ein fyrilestur undir heitinum “Ymisk ýti við supervisión”, men hon fekk tíverri forfall í seinastu løtu, so tí var onki fakligt upplegg hesuferð. Sum sjúkrarøktarfrøðingur er man tó ongantíð ráðaleysur tá ætlanir bresta, og tíðin var brúkt á tamb hóast tað. Fitt av tíð var brúkt til skipaða sparring, har vit í SER enn einaferð bara kunnu staðfesta, hvussu stórt ríkidømi av kreativiteti, ídni og engagementi er í hesum vala hópi. Restin av tíðini fór við at arbeiða við ymiskum dømum um etiskt truplar støður. Dømini vóru skrivað við støðið í hoyringsuppskotinum til yrkisetiskar leiðreglur, sum liggur frítt frammi til hoyringar til allar sjúkrarøktarfrøðingar.

Vit kundu væl brúkt nógv meira tíð til tað arbeiðið og undirritaða má viðganga, at tíðarstýringin kundi verið hópin betri. Men hóast tað, var tað læruríkt at hoyra tey, sum hóast alt fingu stundir at greiða frá teirra umhugsni í samband við tað dømi, tey nú høvdu fingið tillutað.

Vit endaðu við at tosa eitt sindur um talgildu refleksjónina og um hvørt faldarin við teim trimum H´unum og Gibbs refleksjónsfrymli, sum vit settu upp eftir framløguna hjá Marju Lund Gjógvará um hesi refleksjónsamboð á novemberverkstovuni í fjør, er ein hjálp. Vit ímynda okkum, at hann er serliga góður í tí dagliga, tá tað skal ganga skjótt og breið semja var um, at so er. Vit avgjørdu tó, at kveikjaranetið skuldi halda áfram at royna hann av til verkstovuna í oktober. Aftaná tað skuldu vit avgera, um SER eigur at brúka pening uppá, at fáa hann settan upp professionelt og síðan leggja hann á heimasíðuna saman við hinum refleksjónsfaldaranum. Samstundis var hann lagdur út á afturlatna Facebookbólkin “Sjúkrarøktaretiska Ráðið” í ”óprofessionellum” líki. Aftaná oktoburverkstovuna varð avgjørt, at vert er at brúka pening uppá at lata faldaran í professionelt ham og er hann sendur til uppsetingar hjá serfrøðifyritøku.

SER vil takka teimum á Heiminum við Vágna so hjartaliga fyri blíðskap og í hesum sambandi mugu vit serliga nevna Kristinu Viderø, sum fyriskipaði øllum so fyrimyndarliga væl.

### 3. verkstovan, sum var í tveimum

Mánadagin hin 20. og mikudagin hin 22. oktober, vóru triðju og seinastu verkstovurnar hildnar fyri Etikk-kveikjaranetið í ár. Hesuferð vóru leiðarar fyri seg og etikk-kveikjarar fyri seg og verkstovurnar vóru bara hálvan arbeiðsdag til longdar.

Mánadagin vóru tað leiðararnir sum møttu og tá hevði Jóhannes Miðskarð ein sera áhugaverdan fyrilestur fyri okkum, sum hann kallaði: "Leiðsla, etikkur og Søren Kierkegaard". Mikudagin, tá etikk-kveikjararnir møttu, var tað Hanus á Gørðum, sjúkrahús- og fongsulsprestur, sum helt fyrilestur um "Samrøðan ið skapar virðing og margfeldi". Ein rámandi og rørandi fyrilestur, við smekkfult av gullkornum. Restin av skránni var hin sama báðar dagarnar.

Til hesar báðar verkstovurnar var ikki so nógv tíð sett av til felags refleksjónir, tí uppfrísking av teim normativu stevnunum var eisini á skrá. Men nakað av refleksjón høvdu vit áðrenn sjálvan fyrilesturin, sum vit síðan samlaðu upp uppá áðrenn vit fóru hvør til sítt. Enn einaferð kunnu vit staðfesta, at stórur vísdómur liggur í hópinum, og at loysnir til avbjóðingar finnast best í felag.

Næsta verkstovan verður mánadagin hin 12. januar, tá Svanna Jákupsdóttir fer at hava fyrilestur um ymisk ýti í supervisión, har hon millum annað kemur inn á munin millum supervisión og refleksjón. Harafturat kemur Erika Hayfield at hava ein fyrilestur um umsorganaretikk í smásamfeløgum.



Frágreiðingar um verkstovurnar finnur tú her

# NORÐURLENDSKT *samstarv*

## Ferðafrásøgn frá norðurlendska fundinum hjá Sjúkrarøktaretiskum ráðum í døgunum 19. og 20. september 2025

*Einaferð um árið hittast sjúkrarøktaretisku ráðini í Noregi, Danmark, Grønlandi, Svøríki og Føroyum til fundar yvir tveir dagar. Hóast ráðini úr øllum londum kunnu koma við uppskotum og ynskjum um evni at seta á skrá, er tað vertslandið, sum eigur endaligu avgerðina og sum leggur skránna. Hesuferð var tað Svøríki, sum var vertsland og yvirskriftin var "**Røktaretikkur og vitlíki**".*

Fundurin var hildin á Sigtunastiftelsen í elsta svenska býnum Sigtuna, sum liggur nærhendis Arlanda flogvøllin. Betri umstøður til djúphugsni enn á hesum stovni, verður ringt at finna. Tá vit tríggjar, Katrine Klein Arnbjerg, Eva Mortensen Holm og Jana Mortensen komu, dagin fyri at sjálvur fundurin byrjaði, hildu vit, at vit vóru komin til eitt gamalt kleystur. So var tó ikki, sum tað ber til at lesa um niðanfyri, har vit gera eina skjóta gjøgnumgongd av søguni á hesum serliga staðið, sum hugtók okkum so. Friðsælan og andin av felagsskapi á staðnum merkti okkum øll hesar báðar dagarnar og gongur sum ætlað, er tað ikki seinastu ferð, vit vitja í Sigtuna, sum annars er ein ótrúliga sjarmerandi lítil býur.

Sigtunastiftelsen var stovnað í 1917, í eini tíð, sum var merkt av stórum mentanarligum, samfelagsligum og religiøsum umbyltingum. Stovnarin, Manfred Björkquist, vildi skapa eitt stað, har kristintrúgv, humanistiskt dannilsi og samfelagsrefleksjón frítt kundu møtast uttan dogmatisk ella politisk mørk. Dreymurin var at byggja eitt hús, sum bæði skuldi vera borg, heim, skúli og halgidómur- ein stimbrandi miðstaður fyri samrøðu, djúphugsni og intellektuellum forvitni.

Arkitekturin speglar hesa hugsjón. Stovnurin liggur á einum heyggi, og við íblástri frá gomlu kleystrunum, er hann innrættaður við herbergi, bókasavni, lesisalum og einum kappelli, nevnt Olaus-Petri, og er uppkallað eftir ein av størstu kristnireformatorunum í svenskari søgu. Kapellið er eitt sjónligt súmbol um ambitiónina, at sameina trúgv og tanka í einum opnum rúmi.

Í árunum millum veraldarbardagarnar mentist Sigtunastiftelsen til ein týðandi miðdepil fyri bókmentir, mentanarkjak og listaligar fundir. Her kjakaðust rithøvundar og intellektuelt virkin fólk um leiklutin hjá listini, ábyrgdina hjá menniskjanum og politisku gongdina í Evropa í eini tíð, har totalitarisman vaks fram Tá 2. veraldarbardagi brast á, var Sigtuna-stiftelsen karmur um fleiri loyniligar fundir.

Ein av teimum, sum vitjaði staðið, var Dietrich Bonhoeffer, týskur prestur og virkin mótstøðumaður móti nazismuni. Hann ferðaðist fleiri ferðir í Skandinaviu og til Onglands í royndini at vinna stuðul til at veikja stýrið hjá Hitler og at skapa samband millum týsku mótstøðurørsluna og bretsku kirkjuna. Í hesum sambandi hittist hann eisini við norðurlendskar starvsfelagar á Sigtunastiftelsen fyri at kanna møguleikarnar fyri at fremja eina politiska broyting í Týsklandi. Sum kunnugt eydnaðist hetta tíverri ikki, og Bonhoeffer varð hongdur í Flossenbürg-fangaleguni fyri landasvik 9. apríl 1945.

Á sumri í 1945 tók eitt serligt kapittul seg upp í søgu stovnsins. Tá Svøríki við krígslok tók ímóti fangum frá týningarlegunum, var Sigtunastiftelsen umskapað til eitt tilbúgvingarsjúkrahús og eitt stað, har hesi neyðar fólk so spakuliga kundu koma fyri seg aftur. Yvir 600 fólk, einamest jødar, fingu røkt og stuðul á stovninum – eitt sjónligt tekin um humanistisku virðini, sum stovnurin byggir á.

Aftaná kríggi vendi stovnurin aftur til sín leiklut sum mentanar- og dannilsisstovnur. Bókasavnið vaks og húsið gjørdist ein savningardepil fyri granskarar, teologar, listafólk og rithøvundar. Hóast nógv ár eru liðin, hevur stovnurin varðveitt sítt sereyðkenni sum opið rúm fyri samrøðu, djúphugsni og samband millum fólk við ymiskari bakgrund. Ta vikuskifti vit vóru á Sigtuna, hittust ungfólk við ávikavíst ísraelskari og palestinensiskari bakgrund til at umrøða kríggið í miðeystri. Endamálið var at samrøða og veruliga lurta eftir sjónarmiðunum hjá hvørjum øðrum, til tess at fáa størri forstáilsi fyri hvørjum øðrum og á tann hátt at byggja brýr. Vikuna frammanundan høvdu demokratar i Belarus loyniligan fund á stovninum, til at umrøða, hvussu demokratiið kann vinnast fyri heimland teirra. Hesir fundir vóru hildnir í einum húsið sum lá við síðuna av sjálvum høvuðsbygninginum, og vit høvdu ikki atgongd hagar, meðan slíkir fundir vóru hildnir.

Sigtunastiftelsen er í dag ein nýmótans mentanar- og granskingarmiðdepil, sum framvegis byggir á upprunahugsjónina: at skapa eitt stað, har fólk kunnu hugsa, tosa og skriva frítt og finna frið. Við ráðstevnum, seminarum, retreats og mentanartiltøkum er stovnurin eitt livandi umhvørvi fyri refleksjón og samrøðu.

Til ber at lesa meir um Sigtunastiftelsen á heimasíðu teirra: www.sigtunastiftelsen.se

### Samanumtøka av framløgum

Yvirskriftin til sjálvan fundin var Røktaretikkur og vitlíki men í veruleikanum vóru trý høvuðsevni umrødd:

1. Vitlíki og røktaretikkur
2. Veðurlag, heilsa og burðardygd
3. Etikkur í kríggi og humaniterum kreppum

Fleiri framløgur vóru um hesi evni og niðanfyri er ein stuttur samandráttur av framløgunum undir hesum yvirskriftum.

### Vitlíki og røktaretikkur

1. *Johanna Ulfvarson, Sjúkrarøktarfrøðingur, dosentur, E-hälsomyndigheten – Framløga: "AI och etik"*
2. *Petra Svedberg. Sjúkrarøktarfrøðingur, professari í sjúkrarøkt, Høgskolan i Halmstad – Framløga: "AI, omvårdnad och etik"*
3. *Jessica Nihlén-Fahlquist, Dosentur í praktiskari filosofi, universitetslektari í*

*biomedisinskari etikk, Uppsala universitet – Framløga: "Etiska perspektiv på AI i vården"*

4. *Lilas Ali, Sjúkrarøktarfrøðingur, dosentur og forkvinna í Sjuksköterskornas Etikråd – Framløgur: "AI ur sjuksköterskans och patientens perspektiv" og "Chatbot som omvårdnadsverktyg inom heldygnsvård i psykiatrin"*

Vitlíki verður longu brúkt breitt til diagnostikk, triagering, avgerðarstuðul og vágameting. Tøknin hevur stórar møguleikar, men er ongantíð neutral. Hon verður formað av teim dátum, sum venja hana, og kann bæði minka um og økja ójavnar. Dømir frá framløgunum vístu, hvussu skeivleikar og fordómar í dátugrunnunum kunnu elva til skeivar metingar av ávísum bólkum og føra til órættvísar og ójavnar viðgerðargongdir.

Týdningarmestu etisku avbjóðingarnar knýta seg til dygdina í dátunum, umboðan og gjøgnumskygni. Tá vitlíki gevur tilmæli, men menniskju taka avgerðirnar, stinga nýggjar grásonur fyri ábyrgd seg upp. Tí er neyðugt við greiðum karmum, skjalfesting og opinleika. Johanna Ulfvarson frá E-hälsomyndigheten legði dent á tørvin fyri at tryggja dátuvegir, juridiskan greiðleika og betri tøkniskipanir, um vitlíki skal brúkast á ábyrgdarfullan hátt.

**Stutt sagt:** Møguleikarnir við vitlíki kunnu bert loysast úr lagdi, um etikkur, gjøgnumskygni, útbúgving og greið ábyrgdarviðurskifti fylgja við – og um menniskjan áhaldandi er miðdepilin.

## Veðurlag, heilsa og burðardygd

1. *Eva-Lena Einberg, økissjúkrarøktarfrøðingur (DSK),Universitetslektari, Høgskolan Kristianstad – Framløga: "Klimat, hälsa och målkonflikter – vägen till en hållbar hälso- och sjukvård"*
2. *Johanna Skolhäll, økissjúkrarøktarfrøðingur (DSK), Region Värmland – Framløga: "Klimat, hälsa och målkonflikter – vägen till en hållbar hälso- och sjukvård"*

Veðurlagsbroytingar verða lýstar sum størsta hóttanin móti fólkaheilsuni. Tær broyta sjúkumynstur og økja um vandan fyri sjúkum í andaleiðunum, ávirka ta mentalu heilsuna, fremja útbreiðslu av ígerðarsjúkum og raka sárbærar bólkar serliga hart. Samstundis viðvirkar heilsuverkið munandi til $CO_2$–útlátið við nýtslu av tilfari, heilivági, flutningi, orku og við rakstri av talgildum loysnum – herundir vitlíkisskipanum.

Tí er veðurlagsetikkur eisini ein partur av sjúkrarøktaretikkini. Etisku leiðreglurnar hjá ICN (og tær dagførdu føroysku sjúkrarøktaretisku leiðreglurnar, sum eru til hoyringar í løtuni), plikta sjúkrarøktarfrøðingar at taka lut í hjálpararbeiði og tilbúgving í kreppu- og neyðstøðum, eisini teimum, sum standast av veðurlagsbroytingum. Dømi um "klimatsmart vård" vísir, at sjálvt smáar broytingar – sum minni spill, betri burturbeining og sortering, færri óneyðugar prosedurur, talgildir fundir og størri nýtsla av fleirnýtisamboðum – kunnu geva bæði búskaparligar og veðurlagsligar vinningar.

**Stutt sagt:** Veðurlagsábyrgd er eisini sjúklingaábyrgd. Sjúkrarøktarfrøðingar eiga ein týðandi leiklut i at stýra heilsuverkið á burðadygga kós.

## Umsorgan í kríggi – humaniterar meginreglur í verki

*Anneli Eriksson, Sjúkrarøktarfrøðingur og granskingarserfrøðingur, Karolinska Institutet – Global katastrofmedicin*

“Læknar uttan landamørk” (LUL) arbeiðir í kríggi, farsóttum og vanlukkum við støði í meginreglum um humanitet, neutralitet, óheftni og læknaetikk. Anneli Eriksson greiddi frá etiskum tvístøðum, sum hon hevði staðið í, har einki val var gott. Eitt dømi hon tók fram var, at hon mátti velja ímillum at verja starvsfólkini á einari Ebola-klinikk, ella at taka viðgerðarkevjandi sjúklingar inn, sum stóðu uttanfyri portrið og bíðaðu- harav fleiri óiva høvdu Ebola. Eitt annað dømi var, har hon mátti velja millum bólkar av sjúklingum og at varðveita neutralitet í konfliktum, har allar partar fremja yvirgang.

Hesar støður vísa, at etikkur í verki snýr seg um at varðveita virðing og ábyrgd í ekstremt avbjóðandi umstøðum, har tilfeingi ikki røkkur, og har ein má handla, hóast úrslitið ongantíð verður fullkomið.

Meginregla um vitnisburð hjá LUL leggur áherðslu á, at tað eisini er partur av umsorganini at tosa alment og opið um órættvísi. “Silence can certainly kill.”

**Stutt sagt:** Umsorgan í kríggi avdúkar tey mest kompromileysu etisku krøvini.

## Samanumtikið

Tey trý høvuðsevni vísa øll á sama grund-spurningin: *Hvussu veita vit ábyrgdarfulla og menniskjansliga umsorgan og røkt í einum heimi, merktur av tøkniligum broytingum, veðurlagskreppu og altjóða ótryggleika?*

Vitlíki broytir sambandið millum tøkni, ábyrgd og umsorgan og flytur avgerðir inn í nýggjar karmar, har bæði menniskja og tól eiga sín leiklut. Veðurlagsbroytingar binda ábyrgdina hjá heilsuverkinum saman við heilsuni hjá allari planetini og minna okkum á, at røkt og burðardygd eru tætt knýtt saman. Og kríggj og humaniterar kreppur vísa okkum sjálva kjarnuna í etikki: at varðveita tign, menniskjavirði og ábyrgd, tá alt annað tykist ridla.

Tvørtur um tey trý høvuðsevnini var boðskapurin greiðir: Etikkur er ikki ein eginleiki – tað er at gera. Og tað krevur dirvi, góð dømingarevni, samstarv og leiðslu.

Um nakar hevur áhuga í at fáa framløgurnar, ber til at venda sær til okkara á etikkur@sjukrarokt.fo, so skulu vit royna at fáa neyðugu loyvini til vega.

# FELAGS FRAMSØGN FRÁ

*Norðurlendska Etikk-netinum hjá Sjúkrarøktarfrøðingum 2025*

Í samband við norðurlendsku fundirnar, verður altíð ein felags framsøgn orðað:

## HVØR HEVUR VALDIÐ YVIR MENNINGINI AV VITLÍKI INNAN UMSORGANARØKIÐ?

Á einum fundi á Sigtunastiftelsen í september 2025 savnaðist Norðurlendska Etikk-netið hjá sjúkrarøktarfrøðingum at umrøða etisku avleiðingarnar av skjótt vaksandi nýtsluni av vitlíkistøkni innan heilsu- og sjúkrarøkt. Henda áheitan er ein felags framsøgn fyri hugsanir og støðutakanir hjá Etikk-netinum um, hvussu vitlíki ávirkar arbeiðshættir, ábyrgdarbýti og valdsskipanir í heilsuverkinum.

Við vitlíkistøknini broytist heilsu- og sjúkrarøktin skjótt, og við henni koma nýggir møguleikar – men eisini nýggj valdssambond og ógreið ábyrgdarbýti. Sjúkrarøktarfrøðingar hava ein serligan førleika í at skilja tørvin hjá sjúklingunum, tulka samansettar røktarstøður og taka etiskt grundaðar avgerðir. Hesin førleiki eigur at fáa størri ávirkan á menningina av vitlíki. Tað er ikki nóg mikið, at tøknin virkar – hon skal eisini geva meining, rættvísi og tryggleika.

Fyri at hetta skal eydnast, krevst at sjúkrarøktarfrøðingar verða útbúnir í vitlíki og taka lut í teimum avgerðum, sum verða tiknar um nýtsluna av tøknini. Vitlíki skal vera ein stuðul í røktini, ikki koma í staðin fyri menniskju. Etiskar greiningar mugu gerast áðrenn tøknin verður implementerað, og spurningar um ábyrgdarøki mugu verða greiðir og væl lýstir.

Valdið yvir vitlíki eigur at verða býtt sundur. Tøknimenningarfólk eru serfrøðingar í vitlíkisskipanum og kunningartøkni, men heilsufakfólk eru serfrøðingar í menniskjum og røkt-og viðgerðarhøpum. Tá hesi sjónarmið hittast, kann vitlíki nýtast á ein skilagóðan hátt, til at betra um røktina – har tøknin er eitt ískoyti, men ongantíð ein avloysari fyri menniskjaligu umsorganina.

Við kvøðu

Lilas Ali, *forkvinna, Sjuksköterskornas Etikråd, Svensk sjuksköterskeförening (Svøríki)*

Berit Liland, *leiðari, Rådet for sykepleieetik, Norsk sykepleierforbund (Noregi)*

Lisbeth Aaskov Falch, *forkvinna, Sygeplejeetisk Råd (Danmark)*

Pauline Olesen, *forkvinna Kalaallit Nunaanni Peqqissaanermi Ileqqorissaarnissamut Siunnersuisoqatigiit, Sygeplejeetisk råd (Grønland)*

Jana Mortensen, *forkvinna, Sjúkrarøktaretiska Ráðið (Føroyar)*

Umframt hesar framsagnir, samstarva vit javnan um aðrar framsagnir ella yvirlýsingar, sum hava felags áhuga. Eina slíka hava vit júst latið úr hondum:

## YVIRLÝSING FRÁ NORÐURLENDSKU SJÚKRARØKTARETISKU RÁÐNUM UM HARÐSKAP MÓTI HEILSUSTARVSFÓLKI OG SJÚKLINGUM Í SUDAN

Álop á heilsumiðstøðir í Sudan eru økt munandi í sambandi við borgarakríggið sum herjar í økinum. Norðurlendska netið av Sjúkrarøktaretiskum Ráðum vil við hesum vísa sína djúpu dorg og fordøma tann ræðuliga harðskap, sum rakar sjúkrarøktarfrøðingar, sjúklingar og teirra avvarðandi.

Sambært Heimsheilsustovninum (WHO), vísti uppteljingin seinast í oktober, at minst 460 ósekir borgarar vóru dripnir í einum álopi á eitt burðarsjúkrahús. Henda ræðuliga hending er enn eitt dømi um, hvussu eitt friðskjól í heilsuverkinum, ætlað til lív og tryggleika, verður broytt til eitt stað, har neyð, sorg og deyði valdar.

Síðani apríl 2023 hevur WHO váttað 185 álop á sjúkrahús og aðrar heilsustovnar í Sudan. Hesi álop hava kostað lív og elvt til álvarslig mein hjá bæði heilsustarvsfólki og sjúklingum. Álop á sjúkrahús kunnu als ikki góðtakast. Tey eru beinleiðis brot á altjóða mannarættindalóggávu og á grundleggjandi etiskar meginreglur í heilsurøktini. Okkara starvsfelagar – sjúkrarøktarfrøðingar, ljósmøður og annað heilsustarvsfólk – seta sítt egna lív í váða hvønn dag fyri at bjarga øðrum, og teirra dirvi verður møtt við harðskapi. Hetta er ein misgerð móti sjálvum kjarnanum í humaniteti.

Norðurlendsku Sjúkrarøktaretisku Ráðini heita á egnar stjórnir, altjóða felagsskapir og altjóða heilsusamfelagið um at handla skjótast gjørligt fyri at verja heilsustarvsfólk og sjúklingar í Sudan og tryggja, at neyðhjálp kemur fram.

Við hesum vilja vit vísa okkara samhuga við okkara starvsfelagar í Sudan og øllum teimum, sum áhaldandi veita røkt, linna og bjarga lívum undir ómenniskjansligum umstøðum. Heilsurøkt skal altíð vera eitt friðskjól, ongantíð eitt mál fyri harðskapi. At verja menniskjavirði í heilsurøktini er at verja menniskjavirði yvirhøvur.

Vegna Norðurlendsk Sjúkrarøktaretisk Ráð
Lilas Ali, *forkvinna, Sjuksköterskornas Etikråd, Svensk sjuksköterskeförening (Svøríki)*
Berit Liland, *leiðari, Rådet for sykepleieetik, Norsk sykepleierforbund (Noregi)*
Pauline Olesen, *forkvinna Kalaallit Nunaanni Peqqissaanermi Ileqqorissaarnissamut Siunnersuisoqatigiit, Sygeplejeetisk råd (Grønland)*
Jana Mortensen, *forkvinna, Sjúkrarøktaretiska Ráðið (Føroyar)*

Til ber at lesa meira um norðurlendska samstarvi, umframt eldri ferðafrásagnir og felagsframsagnir her

# FØROYSKT SAMSTARV

## RAÐFESTINGAR Í ALMENNUM HEILSUTILBOÐUM

Hin 8. september skipaðu Sjúkrarøktaretiska Ráðið, Etiska Ráðið og Siðsemisnevndini hjá Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar fyri ráðstevnu um raðfestingar í almennum heilsutilboðum.

Ráðstevnan var ætlað at vera eitt fyrsta stig á leiðini til eitt alment orðaskiftið um raðfestingar í heilsutilboðum, sum jú er eitt stórt og komplekst økið og evnið tilsvarandi stórt og komplekst.

Allir framløguhaldarir gjørdu greitt, at økið er undir vaksandi trýsti í og við, at tilfeingið er avmarkað og skipanirnar ikki kunnu ganga øllum ynskjum á møti. Tí er neyðugt at raðfesta. Tað er sum so onki nýtt í tí, tað hava vit vita í áratíggju - ella kanska altíð. Tað sum fleiri tó eisini varpaðu ljós á, sum tíverri ofta ikki kemur í ljósmálan, eru etisku tvístøðurnar sum standast av at noyðast at velja. Hesar koma í, tí ymisk virðir koma í stríð við hvørt annað, og hvat velur man tá? Tað er netupp kjarnin í raðfestingartrupulleikanum. Spurningurin um, hvussu vit raðfesta, er tó alt ov stórur at seta. Tí hvat meina vit við? Politikkarar? Sjúkrarøktarfrøðingar? Stjórar? Deildarleiðarar? Og meina vit við, hvussu tað fer fram ella hvussu tað EIGUR at fara fram? Og hvør hevur yvirblikk yvir tað? Hvat merkir tað yvirhøvur at raðfesta? Tá okkurt økið ella heilsutilboð er raðfest, merkir tað so, at eyka tilfeingið er sett til ella merkir tað, at tikið verður frá einum øki til eitt annað? Og hvussu síggi eg sum borgari, um tað er eitt ella hitt?

Sjálv fekk eg høvi at fordjúpa meg í evni í samband við masterlesnaðin í Sosialvísindum fyri nøkrum árum síðan. Meg minnist enn, hvussu frustrerandi tað var at lesa um, tí so nógv ymisk hugtøk, vísindir og sjónarhorn eru í spæl, tá talan er um raðfestingar innan almenn heilsutilboð. Bara hugtakið rættvísi er ótrúliga stórt, hóast vit brúka tað í dagligari talu, oftast uttan at geva okkum gætur um, hvussu djúptøkið tað í veruleikanum er og hvussu ymiskt tað kann skiljast ella tulkast. Harafturat kemur spurningurin um, hvussu vit máta hetta góða rættvísi. Tosa vit um rættvísi sum útgangsstøði ella endaprodukt av útbýti, ella tosa vit um rættvísi í samband við raðfestingarprosessina? Ella okkurt triðja?

Og so eru tað hesi ymisku stigini, man má hava í huga, tá man tosar um raðfestingar. Makrostigið er tað stigið, har politiska skipanin lutar út til tey ymisku økini í samfelagnum, har heilsuverkið fær ein part. Mikrostigið er so tað, sum verður lutað víðari til tey ymisku økini innan heilsuverkið. Tá hugsar man í bólkum og ikki einstaklingum. Rationeringin er so tað seinasta stigið, sum eisini verður kalla "songjarstokk-raðfesting". Tað sigur seg sjálvt, at tað er stórur munur á at tosa um raðfestingar á Makrostigi og á rationeringsstigi. Tað var júst hetta seinasta, sum eg forsømdi at pallseta fyri

luttakarunum, tá tað fall mær í lut at verða orðstýrari til panelkjakið aftaná, og tí eydnaðist mær ikki at halda orðaskifti meira skarpt uppá ta avmarkingina. Men lat tað so bara verða eina læring til mín sjálvs til eina aðru ferð.

Orðfeingi at skifta orð um raðfestingar á ein meiningsfullan og fruktargóðan hátt er stórt og økið fyri flestu av okkum ókent. Tað skal tí vera mítt ynski, at vit her á landi fara at læra okkum at brúka orðfeingi og leggja okkum eftir at lata okkum upplýsa um økið. Gaman í hevur hvør einstakur av okkum ikki fyri neyðini at læra seg øll møgulig búskaparlig, filosofisk, politologisk o.s.fr. hugtøk. Tó so er týdningarmikið, at øll hesi sjónarhorn eru við í kjakinum og at fakfólk greiða okkum vanligu borgarum frá, hvat tey merkja á ein hátt, at eg kann skilja og verða við í almenna orðaskiftinum um raðfestingar, sum vónandi fer at vinna fram. Tí hóast vit raðfesta innan almenn heilsutilboð á øllum stigum dag og dagliga, er raðfestingin ikki nóg tilvitað og kann verða stýrd av tilvild. IKKI tí at nakar ynskir tað, men tí at økið er so komplekst og forgreinað og armslongdarprinsippið ikki í nóg stóran mun er partur av raðfestingarprosessini.

Sambært fakfólki sum skrivaði menningar-ætlanina fyri sjúkrahúsverkið í 2016, so skáka politikkarar sær undan at taka yvirskipaðar avgerðir, men himprast ikki við at blanda seg í smálutir, har fakligheitin eigur at ráða. Um so er, hevur lobbyisma í so góð kor og vandi er fyri, at tann sum ikki orkar at gera vart við seg, ella hevur onnur sum kunnu gera tað fyri hann, verður við sviðið soð - og tað munnu tey flestu vera samd um, er ikki røtt og rættvís raðfesting.

Tað er sera hugaligt at samstarva við onnur etisk ráð og samstarvið hevur verið framúr gott frá byrjan til enda. Saman standa vit sterk - í øllum førum sterkari.



*Fegin forfólk. Frá vinstru: Liljan Petersen, Siðsemisnevndini hjá Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar, Bergur Debes Joensen frá Etiska Ráðnum og Jana Mortensen frá Sjúkrarøktaretiska Ráðnum.*

Ráðstevnan var stroymd og til ber at síggja hana við leinkjuni: [Raðfestingar í almennum heilsutilboðum].

Í forleingilsi av ráðstevnuni, legði forkvinnan nøkur tekstabrot um evnið á afturlatna bólkin hjá Sjúkrarøktaretiska Ráðnum, við yvirskriftunum Raðfestingar í heilsuverkinum, Rættvís Raðfesting og Raðfestingarprosessin.

## RAÐFESTINGAR Í HEILSUVERKINUM

*Hví tosa um raðfestingar og hvat tosa vit um? Tað fara vit at royna at varpa ljós á við nøkrum tekstabrotum, harav hetta er tað fyrsta.*

Tað er sjáldan, at avbjóðingin við at raðfesta í heilsuverkinum, var so týðilig í nýggjari tíð, sum tá koronafarsóttin herjaði. Vit hoyrdu ræðusøgur uttan úr heimið, har nógv fleiri sjúklingar høvdu tørv á andingarhjálp, enn tað vóru andingartól til taks. Bæði úr Italiu og Spaniu gingu søgur um, at heilsustarvsfólk vórðu biðin um at lata verða við at lata fólk, eldri enn 60 ár, fáa atgongd til avmarkaða talið av andingartólum. Tað vóru ikki nokk tól til øll sum høvdu tørv á andingarhjálp og tey yngru vórðu í hesum førinum raðfest framum tey eldru. Hóast øll lond ikki vóru so trongd sum hesi bæði, trokaðu raðfestingarspurningar seg eisini fram her hjá okkum. Um tað verður neyðugt, hvønn skuldi man so velja framum annan og hví? Hetta eru grundleggjandi spurningar tá talan er um at raðfesta í heilsuverkinum og er tað, sum hesi tekstabrotini hava til endamáls at varpa ljós á.

Spurnatekin var beinanvegin sett við, um tað var rætt at lata samfelagið so nógv aftur, sum tað var gjørt. Ansast má eftir, at "kururin ikki verður verri enn sjálvur trupulleikin", hildu summi. Millum hesi var fyrrverandi forsætisráðharrin í Danmark, Lars Løkke Rasmussen, sum vísti á, at tey víðfevndu stigini, sum stórt sæð øll heimsins lond tóku fyri at basa koronasmittuni, fóru at hava ómetaliga stóra, og í ávísan mun ókenda, ávirkan á bæði lands- og heimsbúskapin. Løkke var bangin fyri, at kururin kundi føra til búskaparligt hóttafall, sum aftur hevur við sær, at minni verður eftir til heilsu, útbúgving, veðurlagsátøk og menningarhjálp, enn tað annars hevði verið

Men danski forsætisráðharrin Mette Frederiksen svaraði aftur við at siga, at menniskjalív kunnu ikki gerast upp í pengum. Í síðsta enda snýr tað seg um álitið til samfelagssáttmálan og tað undirstøði sum vælferðarsamfelagið byggir á. Búskapurin má víkja fyri heilsu, tí tað týdningarmesta er, at so fá doyggja av korona sum gjørligt, sjálvt um prísurin er høgur, segði hon.

Júst hetta, at seta búskaparlig atlit upp í móti menniskjalívum, fellur mongum fyri bróstið, tí tað nettupp er at gera mannalív upp í pengum. Men tað er ein misskiljing at seta roknistykki soleiðis upp, siga onnur. Tað er sum so ikki peningurin í sær sjálvum, sum er mótparturin, men heldur tað, at avleiðingarnar av einum møguligum búskaparskrædlið ella ógvusligari niðurgongd í samfelagsbúskapinum, kann hava við sær, at fleiri doyggja av øðrum ávum enn korona. Valið stendur sostatt millum ymisk mannalív. Hvat er so rætt og rættvíst at gera?

Kjakið er eitt klassiskt stríð millum millum pliktetikkina og utilitarismuna. Ógvuliga stutt, yvirskipað og einfaldað, so ber til at siga, at utilitarisman hevur fokus á avleiðingarnar

og advokerar fyri at minka um pínu og fáa so nógva vælferð sum møguligt. Hinvegin leggur pliktetikkin dent á intentiónina av gerini, og tekur støði í, at summar gerðir altíð eru skeivar, sjálvt um tær í ávísari støðu høvdu gjørt gagn. T.d. vildi ein pliktetikari ikki latið eitt menniskja doyð við tí grundgeving, at tað kundi bjarga 10 øðrum menniskjum. Tað er ongantíð rætt at ofra ein fyri ein annan. Fyri ein utilitarist vildi tað verið skeivt, at latið 10 menniskjur doyð, fyri at bjarga einum, tí avleiðingarnar vildu ført meira pínu við sær, t.d. fyri tey nógv fleiri avvarðandi.

Dømið omanfyri lýsir bara ein brotpart av teimum nógvu trupulleikunum og etisku tvístøðunum sum eru partar av tí, sum undir einum kann eyðmerkjast sum "Raðfestingar í heilsuverkinum". Tó at teir gjørdust serliga presentir í samband við Korounufarsóttina, so eru spurningarnir um raðfestingar í heilsuverkinum tó hvørki nýggir ella fremmandir. Ein av stóru avbjóðingunum í heilsuverkum um allan heim, er avmarkað tilfeingið. Í kjalarvørrinum av hesum stinga spurningar seg upp um, hvussu avmarkaða tilfeingið í heilsuverkinum eigur at verða býtt út, til hvat, hvønn og á hvønn hátt, fyri at man kann siga, at tað er rættvíst og livir upp til krøvini vit seta til eitt demokratiskt vælferðarsamfelag. Raðfesting av felagsgóðsi, sum byggja á virðir um rættvísa útlutan, har hond verður tikin um tey, sum av onkrari orsøk ikki klára seg so væl sjálvi, er ein av berandi súlunum undir demokratiskum vælferðarsamfeløgum. Spurningarnir um raðfestingar eru tí altíð viðkomandi at seta, eisini tá vit ikki hava eina farsótt at dragast við.

Næstan allar avgerðir í heilsuverkinum snúgva seg um raðfestingar, tó at tað ikki altíð er so eyðsýnt ella viðurkent, at tað er tað sum fer fram. At raðfesta merkir, at ein avgerð verður tikin, sum hevur við sær, at tilfeingið verður brúkt at gagna nøkrum sjúkligum framum aðrar. Tilfeingið kann verða nógv ymiskt, t.d. tíð, peningur, útgerð, seingjarpláss og gøgn. Aðaltátturin í raðfestingini er, at tað eru fleiri sum hava tørv á tilfeinginum, enn tað er tilfeingi til taks (Puyol, 2018), og ofta verða avgerðir tiknar um uppraðfestingar, uttan at nakar hugsar um, at tá tey velja at uppraðfesta onkustaðni í skipanini, má niðurraðfestast aðrastaðni.

Tað er ikki tí, at tað altíð er so trupult at meta um, hvør avgerð er røtt. Viðhvørt er eyðsæð hvat eigur at hava forrættindi framum annað. T.d. vildu flestu fólk tikið undir við, at raðfesta viðgerð av húðkrabba framum eftirgjørdan gitnað ella tað at vaksa sær um bringuna. Húðkrabbin kann kosta lív og fólk flest eru samd um, at tað at bjarga lívi, eigur at hava forrætt framum annað, sum ikki er lívshóttandi. Men um veljast skal í millum fólk við svárari giktasjúku og fólk við álvarsligari sálarsjúku, er valið ikki longur so eyðsýn. Harafturat kemur, at tað er sjáldan at valið er so beint fram, tí tað er so nógv onnur atlit, sum spæla inn, t.d. heilsustøðan annars, prognosa, aldur o.s.fr. Tað er í teimum førum, har tað ikki er eyðsýnt hvat er rætt at gera, at raðfestingartrupulleikarnir vísa seg.

Men um tað skal bera til at fáa eyga á raðfestingartrupulleikarnar, má avgerðarprosessin verða klár, greið og sjónlig. Tí er ein annar týðandi táttur í raðfestingini, at gjøgnumskygni er í raðfestingarprosessunum, so til ber at meta um, hvørt raðfestingin endurspeglar samfelagsins virðir, og krøv hjá borgarunum. Av hesum sama mugu tey etisku prinsippini og virðini sum verða brúkt í avgerðargrundarlagnum, verða útgreinað.

Gjøgnumskygni í raðfestingunum er eisini ein treyt til tess at forða fyri, at býtið av tilfeingið verður stýrt av tilvild, valdsmisnýtslu og øðrum viðurskiftum, sum føra til órættvísa raðfesting.

Til at hjálpa sær til ein rættvísa og gjøgnumskygda raðfesting, hava lond rundan um okkum ment ymisk raðfestingarprinsippir og -kriteriir, sum skulu virka sum karmar fyri raðfestingini (Chalkidou et al., 2016). Raðfestingarnar skulu grundast á greiningar av samfelagsstøðuni og verða grundarlag undir avgerðunum um býti av tilfeinginum. Tað liggur soleiðis í raðfestingarprosessini, at hon er politisk, og at politiska arbeiði krevur, at vigað verður millum ymisk áhugamál, har samfelagslig virðir og mál eru týdningarmiklir faktorar í avgerðunum.

Fyrisitingarligu spurningarnir sum standast av tørvinum fyri at raðfesta, snúgva seg um, hvussu heilsuverkið skal skipast og stýrast, fyri at forsvarligar avgerðir verða tiknar um útbýtið av avmarkaða tilfeinginum. Etisku spurningarnir snúgva seg um, hvørji etisk virðir ella normar, útbýtið av tilfeinginum eigur at endurspegla. Tað eru tær politisku avgerðirnar sum avdúka, hvussu stóran týdning etikkurin hevur. Hóast politikkur og etikkur eru tvey ymisk økið, umskarast tey, tá tað snýr seg um raðfestingar í og stýring av heilsuverkinum. Eins og etikkur eigur politikkur soleiðis eisini ein týðandi leiklut í strembanini eftir, at raðfesta so rætt og so rættvíst sum gjørligt.

Spurningurin um raðfestingar er sostatt rættiliga torgreiddur og ikki bara so einfaldur at svara uppá. Men at hann eisini er neyðugur at seta í Føroyum, hevur verið eyðsýnt í nógv ár. Longu í "Álit um framtíðar sjúkrahúsverk í Føroyum" frá 2007, ger arbeiðsbólkurin vart við øktu krøvini til sjúkrahúsverkið og staðfesta:
Tí sleppa vit í Føroyum heldur ikki undan at taka støðu til hesi viðurskifti út frá einum samfelagsligum sjónarhornið, um vit eisini í framtíðini skulu hava eitt gott heilsuverk.

Hóast arbeiðisbólkurin vónaði, at álitið kundi verða við til "at seta gongd á eitt orðaskifti og eina prosess, sum skal føra okkara sjúkrahúsverk trygt inn í framtíðina", so fekst orðaskifti um raðfestingar ikki í lag, hvørki tá ella seinni. Sjálvt um hetta orðaskifti hevur vart í fleiri áratíggju í londunum rundanum okkum, hevur tað ongantíð veruliga fingið fótin fyri seg í Føroyum, hvørki millum fólk flest ella í politisku skipanini.

Arbeiðisbólkurin, sum gjørdi álitið "Menningarætlan fyri sjúkrahúsverk Føroya" sum varð handað landsstýriskvinnuni í Heilsu- og innlendismálum í 2016, ger vart við trupulleikarnar við øktum trýsti á føroyska sjúkrahúsverkið. Tilfeingið stendur ikki mát við tøkniligu frambrotini og fólkafrøðiligu broytingarnar, sum hava við sær, at vit áhaldandi gerast fleiri í tali og fleiri eldri (HIMR, 2016). Alsamt vaksandi gjógvin millum tøkan pening og tørvin á heilsutænastum, ger tað trupult, at veita borgarunum ta viðgerð, sum teimum tørvar ella sum tey ynskja sær. Arbeiðsbólkurin vísir á, at hóast tað er gleðiligt, at nýggj viðgerðarframbrot gera tað møguligt at viðgera fleiri og betri, so økir tað eisini um tørvin "at raðfesta so rætt og so rættvíst sum gjørligt".

Tvístøðurnar sum tey ymisku møta, sum skulu taka avgerðir um raðfestingar ymsastaðni í og um heilsuverkið, eru rættiliga ymiskar, eins og atlitini at taka eru tað. Tað er stórur munur á atlitunum sum politikarar skulu hava fyri eyga, tá teir skulu velja í millum hvussu stór játtanin skal verða til ávikavist heilsuverkið, almannaverkið og skúlaverkið og so teimum atlitinum sjúkrarøktarfrøðingurin skal taka, tá

hon velur ein at koma inn framum ein annan í bíðirúminum á skaðastovuni[2].

## RÆTTVÍS RAÐFESTING

Rættvísi og rímiligheit eru týðandi virði í og undir heilsuverkinum, ikki minst tá tað snýr seg um raðfestingarprosessina og útbýti av tilfeingi. Í norðurlendskum vælferðarsamfeløgum, er solidaritetur eitt týðandi virði í hesum sama. Hesin tankin sæst aftur í endamálsorðingini fyri donsku heilsulógina, um lætta og javnverda atgongd fyri øll (Sundheds- og ældreministeriet, 2018). Hóast lógin ikki er fult út galdandi í síni heild í Føroyum, er endamálsorðingin um lætta og javnverda atgongd eisini galdandi hjá okkum.

Aristoteles hevur havt stóra ávirkan á menningina av rættvísisástøði, og hansara útsøgn um, at javnlík mál skulu viðfarast javnlíkt og ójøvn mál skulu viðfarast ójavnt, samsvarandi viðkomandi munum, verður tulkað upp á ymiskar mátar. Í orðingini liggja fleiri aspekt av rættvísi. T.d. kann "javnverd atgongd" vísa til eitt virði um ikki at gera mannamun. Í tí liggur, at man ikki eigur at gera mun á fólki út frá treytum, sum ikki eru etiskt viðkomandi, t.d. út frá kyni, aldri, landafrøðiligari staðseting, trúgv o.s.fr. Raðfesting snýr seg um at finna útav, hvør skal viðgerast áðrenn onnur, og tað eigur at verða avgjørt út frá prinsippum, sum vísa á etiskt viðkomandi munir á viðgerðum ella sjúklingabólkum.

Hugtakið rættvísi verður brúkt í vanligari talu, oftast uttan at hugsað verður um, at tað kann verða ymiskt, hvat hvør av okkum skilir við ella leggur í hugtakið. Vit hugsa heldur ikki so ofta um, at okkurt er rættvíst. Tað er ikki fyrrenn vit halda, at okkurt er órættvíst, at vit reagera. Sjálvt um vit brúka hugtakið, sum um at semja er um hvat tað er, so eru fleiri og ósambæriligar fatanir av og ástøði um, hvat skal til fyri at siga, at okkurt er rættvíst.

### Útbýtingarrættvísi

Grundgevingarnar fyri, hvat útbýtið er moralskt betri enn annað, eru grundstamman í útbýtingarrættvísið. Øll prinsippir um útbýtingarrættvísi fyrihalda seg til javnað sum eitt rættindi og eru samd um, at øll eiga at fáa sambært sínum rættindum. Hvørji hesi rættindi eru, eru tey tó ikki á einum máli um, líkasum tey hava ymiska fatan av, hvat slag av javnaði, tað er vert at stremba eftir.

Eitt grundleggjandi og áhaldandi orðaskifti um ymisk etisk prinsippir fyri útbýtingarrættvísi er, hvussu man fær navigera í millum ósambærilig virðir, sum at maksimera effektivitetin - og soleiðis fáa sum mest burturúr minstum - javnrættindi - og tí fara líka við øllum - og tað at taka atlit til tey sum hava størstan tørvin, og soleiðis geva teimum framíhjárættindi, sum eru ringast fyri. Fyri at fáa eina fatan av, hvørji prinsippir vísa seg í empiriini, verða tær teoriirnar lýstar, sum hava størsta ávirkan á grundgevingarnar fyri rættvísum útbýtið í heilsuverkinum. Hesar eru egalitarisma, prioritanisma og utilitarisma. Til hvørt av ástøðinum er eitt yvirskipað prinsipp og 2 undirskipað kriteriir.

[2] Tekstur við keldum og keldulista er at finna á heimasíðuni

Fyri greidleikan, eru hesi sett inn í eina talvu:

| | |
|---|---|
| **Egalitarisma**<br>Fara eins við fólki | Fyrstur kemur, fyrstur fær |
| | Trekkja lut |
| **Prioritanisma**<br>Framíhjárætt til tey sum eru ringast fyri | Sjúkastu fyrst |
| | Yngstu fyrst |
| **Utilitarisma**<br>Maksimera summin av ágóðum | Bjarga flest lívum |
| | Útbýtið við støði í útlitum |

*Egin talva við støði í keldunum, sum víst er til í tekstabrotinum um útbýtingarrættvísi.*

## Egalitarisma

Grundarlagið undir egalitaristisku modellini er fatanin av, at menniskju er javnverd og at skapa møguleikar fyri fólk soleiðis, at tey verða so javnstillað sum gjørligt við onnur, eisini tá tað kemur til heilsu og vælveru.

### Fara eins við fólki

Tað at fara líka við fólki, er eitt grundleggjandi virði undir egalitarismuni. Men viðhvørt kann tilfeingið ikki býtast sundur, soleiðis at øll kunnu fáa eitt sindur minni, tó at øll fáa okkurt. Tað ger seg millum annað galdandi í samband við útluting av andingartólum ella gøgnum. Tá er brúk fyri einari eind til hvørt fólki, og tí má útbýti snúgvast frá hugsanini, um at øll skulu hava líka nógv, til at øll skulu hava sama møguleika. Tað eru tvey prinsippir sum royna at miðja eftir, at rúma hesum virði. Annað er prinsippið um **at trekkja lut** og hitt er **at lata tann fáa fyrst, sum kemur fyrst**.

Tað **at trekkja lut** um, hvør skal hava hvat, hevur fleiri fyrimunir. Tað at hvør einstakur hevur sama moralska status og sostatt sama virði, stuðlar undir hugsanini um, at øll hava sama rætt til ágóðarnar. Tankin um, at vit øll vilja yvirliva, og at tað ynski telur líka nógv, uttan mun til nakað annað, stuðlar undir prinsippið um lutakast. Í praksis er prinsippið eisini lætt og skjótt at brúka, tí tað krevur lítla vitan um móttakaran frammanundan. Harafturat er lutakast mótstøðuført móti korruptión og mutri.

Men tað eru eisini vansar við hesum prinsippinum. Ein tann størsti er, at prinsippið onki eyga hevur fyri faktorar, sum vísa seg at verða viðkomandi. Tilvildarligar avgerðir ímillum ein, sum kann fáa 40 ár eyka og ein sum í mesta lagið hevur 4 mánaðir eftir at liva í, ella ein sum hevur livað 80 ár og ein sum bara hevur 20 ár á baki, tykjast verða óhóskandi. Tað at fara líka við fólki, merkir ofta, at tey ikki verða viðfarin sum javnverd. Hóast tað ikki er nokk, bara at trekkja lut í samband við útbýtið, so peika fyrimunirnir á, at tað er vert at royna at sameina tað við onnur prinsippir, sum viga upp fyri vansarnar.

Hitt prinsippið, sum er **fyrstur kemur, fyrstur fær**, er intuitivt tað sum vit vænta og meta rættvíst, í samband við bíðiraðir. Tað eru eisini nógv sum taka undir við hesum prinsippinum, og nevna tað "náttúrligt lutakast". Eins og prinsippið um lutakast, er

hetta eitt egalitarianskt prinsipp, og tey sum taka undir við hesum halda, at prinsippið fremur javnrættindi og gevur fólki somu møguleikar. Sum prinsippið um lutakast, er tað eisini skjótt og lætt at brúka og sleppur teimum sum skulu taka avgerðir um raðfestingar undan óbehagiligum avgerðum.

Men hetta prinsippið yvirsær eisini viðkomandi munir millum fólk, og tí verða tey heldur ikki við hesum prinsippinum viðfarin sum javnverd. Bæði í veruleikanum og í myndatalu, eru tað tey sterkastu, sum kunnu vinna sær fram í røðini. Tað merkir, at prinsippið um "fyrstur kemur, fær fyrst", loyvir moralskt óviðkomandi faktorum, sum ríkidømi og makt, at hava avgerðandi týdning í raðfestingini.

## Prioritanisma

Líka sum egalitarisman sigur prioritanisman, at tá ágóðin sum kemur burturúr útbýtinum kemur øllum til góðar, so er tað rættvíst. Munurin millum prinsippini er, at har egalitaristarnir vilja lata tilvildina ráða, vilja prioritanistarnir lata tørvin fyri ágóðanum ráða, soleiðis at tey sum eru ringast fyri fáa mest.

### Framíhjárætt til tey, sum eru ringast fyri

Summi tulka tað at verða ringast fyri, sum tað at mangla týdningarmiklar ágóðar her og nú, meðan onnur halda tað snýr seg um at mangla slíkar ágóðar gjøgnum lívsskeiðið. Tey bæði prinsippini, sum byggja á hendan hugsanarháttin, eru **sjúkastu fyrst** og **yngstu fyrst**.

Við at viðgera tey **sjúkastu fyrst**, verða tey raðfest fremst, sum annars hava ringastu framtíðarútlitini, um tey ikki verða viðgjørd. Bjargingarreglan (Rule of rescue) er eitt prinsipp sum krevur, at er onkur doyggjandi, skulu hesi bjargast fyrst, og samsvarar við prinsippið um, at tey sjúkastu skulu hava fremsta rætt. Intuitivt tykist hetta eisini rætt og rímiligt fyri fólk flest. Men onnur halda, at tey sum eru sjúkast, ofta eisini eru tey sum eru ringast fyri annars, tí frískari fólk høvdu hórað undan uttan viðgerð. Í sjálvum sær tekur prinsippið ikki atlit til útlitini til eftirviðgerð, og tað er eisini galdandi, tá lítið er at vinna, hóast stóran kostnað. Ein annar vansi er, at prinsippið er stuttskygt og soleiðis tekur støði í, hvør er sjúkast her og nú. Spurnatekin kann tí setast við, um tilvildarligi tíðarlummin er moralskt viðkomandi í eini sperdari støðu, har tilfeingið er avmarkað. Um fleiri fólk hava tørv á eini livur og bara ein er til taks, krevur prinsippið, at tann sum er sjúkast, fær livrina. Prinsippið tekur ikki atlit til útlitini fyri, at viðkomandi er so mikið væl fyri, at hann kann fáa gagn av livrini, ella at onnur sum bíða, fara at verða líka sjúk sum hesin, um tey ikki fáa eina livur. Eitt týðandi element sum prinsippið yvirsær er sostatt, at tilfeingisavmarkingin ikki er tíðaravmarkað og at ongin trygd er fyri, at ein nýggj livur verður til taks til tey bíðandi.

Við at raðfesta tey **yngstu fyrst**, verður atlit tikið til tey sum eru ringast fyri, soleiðis at skilja at tey sum hava livað stytst, hava flest ár at missa. Teirra missur er tí størri, enn tann hjá einum eldri (John & Richardson, 2003). Intuitivt eru nógv sum halda, at hetta virkar moralskt viðkomandi og sum ein rættvís loysn. Men tað skal eisini raðfestast í millum tey sum eru ung, so tí verður ein nýføðingur raðfestur framum ein tannáring. Tá eru tað fleiri, sum kanska ikki halda tað er so eyðsýnt longur. Mótmælini eru slík sum, at tannáringurin skilir hvat gongur fyri seg, hann hevur ment eina persónsmensku og hevur lagt ætlanir fyri lívið. Ein annar vansi er, at hetta prinsippið heldur ikki tekur atlit til útlit. Tað vil siga, at hóast

vánirnar eru fyri, at nýføðingurin doyr hóast viðgerð, má tannáringurin lúta, hóast góðar vánir fyri, at hann hevði komið seg væl við viðgerð. Yngstu fyrst prinsippið kann sostatt heldur ikki standa einsamalt.

## Utilitarisma

Yvirskipaða endamálið í utilitarismuni er at maksimera vælferðina á samfelagsstøði. Rættvísi sambært hesum prinsippinum er, tá raðfestingarnar hava við sær, at tær tilsamans geva mest lívskvalitet.

### Maksimera summin av ágóðum

Prinsippið um at **bjarga flest lívum** tekur støði í, at hvørt einstakt lív hevur sama virði, so tí tykist tað ikki, sum at neyðugt er at rættvísgera hetta prinsippið. Alt annað líka krevur tað bara, at stendur valið millum eitt og fimm lív, so skulu tey fimm bjargast óansæð. Trupulleikin er tó, at alt annað sjáldan ella ongantíð er líka. Summi lív hava vart styttri enn onnur og summi lív kunnu leingjast meira enn onnur. Tað tykist tí órættvíst, at atlit als ikki skal takast til slíkar faktorar, men bara lív fyri lív. Hetta prinsippið kann tí heldur ikki standa einsamalt, í øllum førum ikki, tá alt annað ikki er líka.

Heldur enn at bjarga mest lívum, er málið við **útbýti við støði í útlitum**, at bjarga flest liviárum. Grundarlagið undir hugtakinum liviár er, at eitt ár við líðing, sjúku ella virkistarni, minkar um kvalitetin í einum ári, sæð í mun til, um hesi trupulleikar ikki vóru. Hvussu stór kvalitetsminkingin er, er tongt at hvussu svárur trupulleikin er, og eitt tal verður so ásett út frá tí metingini. Er man frískur, er eitt liviár tað sama sum eitt ár og fær tí talið 1. Eitt ár við ávísari pínu, kann t.d. gera, at árið minkar í virði. Hetta virði verður so ásett samsvarandi tað, sum man við kvantifisering av ávísum parametrum metir, at minkingin skal verða. Virði í árinum kann t.d. minka niður í 0,7.

Maksimering av árum, virkar eisini intuitivt sum ein rættvís loysn. Hugsanarhátturin er, at av tí at tað er virðismikið at liva fleiri ár, má tað verða tilsvarandi virðismikið, at bjarga fleiri liviárum. Men ein vansi er, at prinsippið ikki megnar at taka atlit til útbýtið og kvantitet. Prinsippið sigur onki um, hvørt tann 80 ára gamli ella tann 20 ára gamli skal fáa eitt ár eyka, og tað tykist órættvíst. Prinsippið sigur heldur onki um, um liviárini sum kunnu bjargast, skulu lutast út til nøkur fáa, ella færri ár skulu lutast út til fleiri. So hóast fyrimunir, kann tað ikki standa einsamalt.

## Prinsippir í samheingi

Raðfestingar í heilsuverkinum hava við sær, at man noyðist at viga ósameinilig áhugamál upp í móti hvørjum, sum tá talan er um at viga ymisk etisk prinsippir í móti hvørjum øðrum (Frazão et al.,2018). Tað bøtir um dygdina í avgerðunum, um tær verða tiknar við støði í eksplisittum, skipaðum tilgongdum og teknikkum, sum undir einum verða nevnd “Multiple Criteria Decision Analysis” (MCDA).

Tað er eitt paraplyhugtak, fyri ymiskar formellar tilgongdir, sum skulu hjálpa teimum sum skulu taka týdningarmiklar avgerðir um raðfestingar.

MCDA tilgongdirnar hava til endamáls at meta um ymisk kriterii ella prinsippir, sum eru í stríð við hvørt annað, og sameina hesi, soleiðis at tað ber til at gera eina samlaða meting. Tað at viga prinsippir ímóti hvørjum øðrum í samheingi, soleiðis at onki prinsipp stendur einsamalt, er ein grundleggjandi treyt í royndini at raðfesta so rætt og so rættvíst sum gjørligt. Ein treyt í samband við MCDA er proseduralt rættvísi,

tað vil siga, at sjálv avgerðarprosessin er gjøgnumskygd, soleiðis at fólk kunnu síggja, skilja og møguliga kæra avgerðirnar.

Gransking í og tilgongdin til rættvísa raðfesting í heilsuverkinum, kann býtast í tveir høvuðsbólkar. Annar hevur høvuðsfokus á útbýtingarrættvísi, tað vil siga hevur fokus á, hvat úrslit kemur burtur úr eini raðfesting. Hin bólkurin leggur seg eftir at røkka rættvísi, við at tryggja prosedurala rættvísi. Útgangsstøði fyri hetta seinna er, at um prosessin er rættvís, er úrslitið tað eisini.[3]

## RAÐFESTINGARPROSESSIN

Hesin næsti parturin snýr seg um sjálva raðfestingarprosessina, sum er tætt tongd at avgerðarprosessini um raðfestingar. Ein avgerðarprosess fevnir um ta røð av handlingum ella metingum, sum føra fram til, at ein avgerð verður tikin og sett í verk. Yvirskipað sæð, kann avgerðin býtast í trý lið, sum eru at savna inn upplýsingar, velja millum valmøguleikar og at seta endaligu avgerðina í verk.

Í granskingarbókmentum verður vanliga víst til nøkur atlit, sum eru neyðug at hugsa inn í avgerðarprosessina um raðfestingar, fyri at hon skal verða rættvís. Williams et al (2012) flokka hesi atlit í fýra treytir, sum eru at raðfestingarprosessin er rættvís, at taka evidensbaseraðar avgerðir, at involvera almenningin og at innhugsa etikk.




**Mynd 1** *Røtt og rættvís raðfesting - egin mynd*

Rættvís raðfesting skal tryggja rættargangsliga ella prosedurala rættvísi. Tað vil siga, at gongdin fram til úrslitið av raðfestingini verður tryggjað. Breið semja er í granskingarbókmentunum um, at ein rættvís prosess ber í sær, at fólk verða hoyrd, verða viðfarin virðiligt, og at tey sum verða rakt av avgerðunum, hava álit á tey sum taka avgerðirnar. Harafturat má óheftni verða ein treyt og møguleiki má verða fyri kæra avgerðirnar.

Raðfestingarprosessin skal verða opin og gjøgnumkygd, og avgerðirnar skulu byggja á fakligar grundgevingar og evidens. Harafturat

[3] Tekstur við keldum og keldulista er at finna á heimasíðuni

skulu tær grundast á treytir og grundgevingar, sum fólk flest halda verða rímiligar og sum tey kunnu taka undir við, geva ein rímiligan og rættvísan raðfestingarúrskurð. Proseduralt rættvísi leggur seg soleiðis upp at idealinum um deliberativt demokrati, sum er, at so nógv sum gjørligt luttaka í politiska orðaskiftinum og soleiðis eru við til at legitimera avgerðirnar sum verða tiknar. Grundprinsippið í deliberativa demokratinum er, at øll sum verða rakt av eini avgerð, eiga at verða við í avgerðarprosessini, soleiðis at skilja, at teirra sjónarhorn er umboðað í avgerðarprosessini. Tá talan er um raðfestingar í heilsuverkinum, raka avgerðirnar í veruleikanum okkum øll, tí vit øll potentielt kunnu fáa brúk fyri heilsutænastunum.

At raðfestingin skal byggja á **evidensgrundaðar avgerðir** er serliga galdandi, tá valið stendur millum ymiskar viðgerðir, t.d. ymiskan heilivág, slag av skurðviðgerðum o.a. Í eini metodumeting verður effektin, trygdin og kostnaðareffektiviteturin av metoduni mettur á ein skipaðan hátt. Tað er neyðugt, fyri at finna fram til alternativkostnaðin. Tá ein viðgerð verður vald, kemur hon at kosta eitt ávíst (Pedersen, 2015). Tann peningurin kann ikki brúkast til onnur tiltøk, sum aðrir sjúklingar høvdu kunnað fingið nyttu burturúr. Tann nyttan, sum teir sjúklingarnir høvdu kunnu fingið burturúr somu pengum, verður rópt alternativkostnaður. Tí er alneyðugt, at fáa vitan og fakta til vega, at byggja raðfestingina á. Hugtakið um alternativkostnað avmarkar seg tó ikki til metodumetingar, men verður brúkt breitt.

Sambært Mooney er hin mest týðandi grundgevingin fyri at **involvera almenningin** tað, at tað bara eru borgararnir, sum kunnu veita teimum sum taka avgerðirnar eina fullgóða greinargerð fyri, hvørjir ágóðar tað er, sum almenningurin vil hava, skal síggjast aftur í raðfestingarúrslitinum. Tey sum taka avgerðirnar, umboða ein breiðan veljaraskara, og skulu tí grunda sínar avgerðir um raðfestingar á sosialu samfelagsvirðini og tær væntanir, sum samfelagið hevur til heilsuverkið.

Rawls (1990) argumenterar fyri, at grundleggjandi samfelagsskipanir- og stovnar eru rættvísir, um fólk kunnu verið samd um at skipa teir, við atliti til egin áhugamál. Hann hugsar sær til eina upprunastøðu, har fólk skulu gera ein samfelagssáttmála. Men tey skulu velja handan a veil of ignorance ella ókunnleikans slør. Tað vil siga, at valið skal takast út frá tí, at tey ikki sjálvi vita, hvørja støðu tey hava í samfelagnum. Av tí at tað er ein møguleiki fyri, at tey eru uppi í teimum sum eru ringast fyri í samfelagnum, fara fólk at velja út frá tí støðuni. Tí fara tey altíð at velja við tí í huga, at taka atlit til tey veikastu. Hetta virði samsvarar væl við grundvirðini í vælferðarsamfelagnum.

At innhugsa etikk er ein náttúrlig fylgja av, at raðfestingar í almennum heilsuverkum skulu avspegla sosialu virðini og etisku prinsippini, sum samfelagið byggir á. Umframt prosedurala rættvísi, kann talan verða um eina røð av etiskum stevnum sum byggja á útbýtingarrættvísi, t.d. egalitarisma, har yvirskipaða endamálið er javnaður, utilitarisma, har endamálið er at fáa sum mest fyri flest, og prioritanisma har denturin er lagdur á at geva teimum sum eru ringast fyri fyrst. Etisku stevnurnar kunnu greinast í ymisk meira spesifik kriterii. Eitt dømi er prioritanistiska bjargingarreglan, sum treytar, at um onkur er doyggjandi, eigur hesin altíð at fáa hjálp fyrst (ibid). Hetta stendur tó í andsøgn til utilitaristiska atlitið at bjarga teimum sum mest sannlíkt hava longri tíð eftir at liva í, um tey verða bjargað.

Alt eftir mentanini og virðunum í samfelagnum, vil tað verða ymiskt, hvørji kriterii verða hildin at hava týdning og hvørji elva til sínámillum stríð. Í avgerðarprosessini noyðist man at viga ósameinilig áhugamál upp í móti hvørjum, sum tá talan er um at viga ymisk etisk prinsippir í móti hvørjum øðrum. Gransking innan økið vísir, at tað bøtir um dygdina í avgerðunum, at sameina ymisk kriterii ella prinsippir, sum eru í stríð við hvørt annað, soleiðis at tað ber til at gera eina samlaða meting. Ein treyt er tí, at prinsippini eru orðborin og týðilig og at avgerðarprosessin er gjøgnumskygd, soleiðis at fólk kunnu síggja, skilja og møguliga kæra avgerðirnar. Tað at viga prinsippir ímóti hvørjum øðrum í samheingi, soleiðis at onki prinsipp stendur einsamalt, er ein grundleggjandi treyt í royndini at raðfesta so rætt og so rættvíst sum gjørligt.

Hóast tað ikki ber til at lúka allar treytirnar fyri rættvísari avgerðarprosess fult út, t.d. tí at nøktandi dátur ikki kunnu fáast til vega, sum undirbyggja evidenspartin, so er boðskapurin tann, at hóast tað møguliga ikki ber til at røkka málinum 100 %, ber til at røkka langt við at gera tað besta sum ber til. Hetta krevur tó, at man hevur eitt mál og at raðfestingin er skipað og sjónlig. At raðfesta skipað og sjónligt merkir, at avgerðirnar um raðfestingarnar verða tiknar við støði í einum greiðum og sjónligum grundarlagi fyri, hvørji atlit verða tikin við í avgerðargrundarlagi og hvussu hesi verða vigað upp í móti hvørjum øðrum í avgerðarprosessini. Í granskingar-bókmentunum verður hetta kallað fyri eksplisit raðfesting.

Breið semja er í granskingarbókmentunum um, at eksplisit raðfesting er besti mátin at tryggja eitt so rættvíst raðfestingarúrslit sum gjørligt. Hetta slagið av raðfestingum fer fram eftir ávísum prinsippum og treytum og avgerðargrundarlagið er sjónligt fyri øll. Tað mótsetta av eksplisittari raðfesting er ósjónlig og óskipað raðfesting, sum verður nevnd implisit raðfesting. Hendan raðfestingargongdin verður lýst sum ad hoc raðfesting, har reglurnar fyri hvussu raðfestingin fer fram, antin eru ógjøgnumskygdar ella fráverandi. Tá hvørki avgerðirnar ella avgerðargrundarlagið eru sjónlig, er vandi fyri tilvildarligum raðfestingaravgerðum, sum føra til misjavnt og órættvíst útbýtið av avmarkaðum tilfeingið. T.d. kunnu tilfeingissterkir áhugabólkar verða tiknir framum veikari bólkar, sum ikki megna so væl at gera vart við seg.[4]

## Breddi um evnið

Endamálið við Ráðstevnuni, var at fáa eitt kjak í lag um evnið. Tað var tí hugaligt, at Kringvarp Føroya hevði áhugað fyri ráðstevnuni og tosaði við forfólkini í teimum fyriskipandi ráðunum í morgunsendingini og eftirfylgjandi viðgjørdi evni í Breddanum.

## Ráðstevna um virkna deyðshjálp

Góða samstarvið heldur áfram millum hesi trý etisku ráðini og hin 22. apríl skipa vit fyri eina ráðstevnu í felag, hesuferð við evninum “Virkin deyðshjálp”. Nógv meira verður at frætta um hetta, tá vit koma inn í nýggja árið.

[4] Tekstur við keldum og keldulista er at finna á heimasíðuni

# EIN FYRILESTUR UM *dannilsi, etikk, sóma, sjálvsfatan – og kærleika*



Hin 27. oktober skipaðu vit fyri einum fyrilestri í Løkshøll við Kathrine Lilleør, sum er sóknarprestur í Sankt Pauls kirkju í Keypmannahavn. Hon hevur skrivað fleiri bestseljarar og er bókaaktuell komandi ár við eini lestrarbók til allar sunnudagar í kirkjuárinum – við íblástri frá føroysku siðvenjuni við lestrarbókum. Hon er kend fyri sínar greiðu og kerligu meiningar í almenna orðaskiftinum og hevur í meira enn 20 ár havt fastan teig í Berlingske Tidende.

Fyrilesturin setti spurnartekin við, hvat dannilsi merkir í okkara tíð, og hvussu vit kunnu læra at duga betri at møta hvørjum øðrum við virðing, sóma og næstakærleika. Í hesum áhugaverda fyrilestri gav Kathrine Lilleør eitt boð uppá, hvussu etikkur, sjálvsfatan og kærleiki hanga saman – og hvussu tey kunnu vegleiða okkum, bæði í persónliga lívinum og í samfelagnum annars.

At greiðu meiningar hennara kunnu provokera, sóu vit eisini dømi um hetta kvøldið, ta hon kom inn á bæði fosturtøku og virkna deyðshjálp. Tað er ymiskt, hvussu fólk hava hoyrt tað hon segði og eg dugi tíverri ikki at endurgeva nóg væl og velji tí ikki at royna, fyri ikki at gera henni órætt. Men Trúboðin hevði ein blogg stutt eftir sum leinkjan vísir til, eftir Tummas Kannuberg og sum hann kallaði Hugleiðing eftir fyrilestur hjá Kathrine Lilleør in 27. oktobur.

# BØKUR & *smárit*

Viðhvørt kemur man fram á ymiskt hugaligt á alnótini og tá so er, verður tað lagt á heimasíðuna undir Amboð til refleksjón. Niðanfyri er okkurt tikið úr lítlu rúgvuni, men koma tit framá okkurt, gev okkum eitt prei, so verður lagt út, so vit hava tað savna.

- Handbook for Rural Health Care Ethics
- Rural Helath Care Ethics
- Etik i ældreplejen- en manual

# FORKVINNAN *takkar fyri seg*

Hetta er seinasta ársfrágreiðing hjá mær, í øllum førum í hesum umfari. Av tí at eg eri farin undir lesnað, ber mær ikki til at røkja forkvinnupostin til lítar og velji eg tí at leggja frá mær og lata frískar kreftir sleppa til.

Eg eri ómetaliga takksom fyri, at verða sloppin at røkja hendan postin og ynski verðandi og komandi ráðslimum gott treysti og blíðan byr.

Eg fari at enda ársfrágreiðingina við eini inniligari áheitan um, ikki at lata SER fara fyri bakka. Á rundferð, sum SER gjørdi til ymisk støð í Føroyum í 2023, spurdu vit møttu limirnar ymiskar spurningar. Millum hesar var spurningurin: ”Skulu vit hava eitt sjúkra-røktaretiskt ráð? Grundgev fyri svarinum”. Henda sama spurning settu vit Etikk-kveikjara-netinum á verkstovuni í januar 2026.

Grundgevingarnar eru ymiskar og eisini eru fleiri sum halda, at Ráðið kundi verið skipað øðrvísi. Men øll hava svarað, at vit eiga at hava eitt sjúkrarøktaretiskt ráð, ikki minst nú vit hava fingið Etikk-kveikjaranetið, sum ger mun úti í praksis.

Samstundis gongur ótrúliga striltið at rekruttera ráðslimir og tann trupulleikin hevur verið í nógv, nógv ár. Fortreytin fyri at hava eitt ráð, er sjálvsagt, at limir melda seg til arbeiðið. Sjálv havi eg sitið í 7 ár í hesum umfarinum, og í hesum tíðarskeiðnum hava vit arbeitt við at gera SER meira sjónligt og lættari atkomiligt fyri limirnar. Eg haldi, at tað hevur eydnast í ávísan mun, men tað hevur tó ikki broytt uppá rekrutteringsstøðuna.

Nú eg leggi frá mær, eru bert 4 limir eftir, og tað er heldur lítið. Mítt brennandi ynski og inniliga áheitan er tí, at onkur sær hetta arbeiðið sum verandi so mikið týdningarmikið, at tey ikki vilja lata tað fara fyri bakka og tí vilja stilla upp. Skriva til etikkur@sjukrarokt.fo og boða frá, at tú vil royna teg.
Nærri kunning fæst her

At enda vil eg at takka tykkum mongu, sum eg havi samstarvað við hesa tíðina. Nú eg við takksemi seti meg at hugsa um tað, eru tað fleiri hundrað fólk, mær er vorðið unt at hitta og samstarva við í størri og minni mun. Tí tori eg ikki at byrja at nevna nakran, men vil bara takka tykkum øllum fyri gott samstarv og fylgi og stuðul á leiðini. Stóra takk fyri meg og alt tað besta ynskist øllum.
*Jana Mortensen, forkvinna*

Við hesum vilja vit í SER takka fyri gott samstarv og góða undirtøku í brátt farna árið.

**Sjúkrarøktaretiska Ráðið**
Jana Mortensen, *forkvinna*
Lilian Dam, *næstforkvinna*
Ingun Gaardbo, *kassarøkil*
Eva Mortensen Holm, *skrivari*
Katrine Klein Arnbjerg, *ráðslimur*



AnniJanni

Sjúkraøktaretiska
Ráðið

Meira kunning um Sjúkraøktaretiska Ráðið fæst á heimasíðuni hjá
Felagið Føroyskir Sjúkraøktarfrøðingar: ***www.sjukrarokt.fo***

Vit eru eisini at finna á Facebook: Sjúkraøktaretiska Ráðið
***https://www.facebook.com/groups/524279708341248/***

Samband fæst við ráðið við telduposti á: ***etikkur@sjukrarokt.fo***